# FÓTBÓLTUR 2026

MeistaraDeildin






**FSF FÓTBÓLTSBLAÐIÐ 2026**
**Útgevari:** Fótbóltssamband Føroya
**Ábyrgd:** Hans Erik Danielsen
**Tekstur:** Heðin Arge, Tróndur Arge, Símun Christian Olsen, Terji Nielsen og Hans Erik Danielsen
**Myndir:** Jóhanna Thomsen og Hans Erik Danielsen
**Grafiskur sniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Prent:** Føroyaprent

***www.fsf.fo***

Oddagrein



# Eitt nýtt og spennandi fótbóltsár

**Christian F. Andreasen**
*Forseti í Fótbóltssambandi Føroya*

***Eitt nýtt og spennandi fótbóltsár stendur fyri durum, við nýggjum møguleikum. Vit skulu venja okkum við nýggja heitið, MeistaraDeildin, og seinni í kappingarárinum fer størri dentur at verða lagdur á rættvísi á vøllinum, nú VAR fer at verða tikið í nýtslu í føroyskum fótbólti***

Fótbólturin í Føroyum heldur fram at vaksa, og áhugin kring landið og uttanlands er størri enn nakrantíð, og ongantíð hava so nógv børn og vaksin verið virkin í fótbólti sum nú. Við nýggjum kappingarári koma eisini nýggjar avbjóðingar, men eisini møguleikar, og feløgini hava fyrireikað seg væl og gjølla til at taka næsta stig.

Tað merkist, at spenningsstøðið er hægri enn vanligt, og í landsliðshøpi skulu vit eisini royna at byggja víðari uppá góðu úrslitini frá í fjør, tá bæði kvinnur og menn settu stigamet.

Ein av størstu broytingum í ár, samanborið við undanfarin ár í føroyskum fótbólt, er VAR. Og um alt gongur eftir ætlan, og eftir drúgvar fyrireikingar, verður VAR fastur partur av dystunum í MeistaraDeildini hjá monnum seinni í hesum kappingarárinum.

Endamálið við VAR er at tryggja greiðari og betri avgerðir hjá dómarunum, og størri rættvísi fyri bæði spælarar, venjarar, áskoðarar, fjølmiðlar og onnur, ið varða av føroyskum fótbólti. Samstundis fer VAR at vera ein týðandi partur av at menna okkum sum fótbóltstjóð.

Men sjálvt um nýggj tøkni gevur nýggjar møguleikar, er hjartaslátturin í føroyskum fótbólti framvegis tann sama: Felagsskapurin, viljin og kenslan av at standa saman. Vit fara nú inn í eitt ár, har vit bæði varðveita okkara siðir og taka fet fram í framtíðina. Og tað boðar frá góðum.

Umframt høvuðsstuðlunum hjá nýggju Meistara-Deildini, Bygma Balslev, Føroya Tele og Atlantic Airways, vil eg eisini nýta høvið at takka hinum dyggu stuðlunum. MBM, sum høvuðsstuðul hjá kappingunum um Løgmanssteypið hjá bæði kvinnum og monnum, umframt steypakappingunum hjá teimum yngru. Bakkafrost, enn sum dyggur stuðul hjá manslands-liðnum, og somuleiðis Smyril Line, ið heldur fram sum høvuðsstuðul hjá kvinnulandsliðnum. Takk.

**Við hesum fari eg at ynskja okkum øllum eitt gott fótbóltsár 2026.**








# Grafiski samleikin

***Nýggja MeistaraDeildin er ment við einum greiðum endamálið: At geva bestu føroysku fótbóltsdeildini – hjá bæði kvinnum og monnum – sín heilt egna og serstaka grafiska samleika. Ein samleika, sum bæði endurspeglar hægsta stig í føroyskum fótbólti og styrkir kappingina sum eitt sjálvstøðugt brand***

**Búmerkið er sniðgivið innanhýsis í FSF eins og samleikin eisini er mentur innanhýsis.** Samleikin er mentur til eitt sterkt og samanhangandi eyðkenni, fótbóltinum at frama. Úrslitið er ein visuellur samleiki, sum sameinar føroysku náttúruna, kappingarandan og modernaða sniðgeving.



## NAVNIÐ

Navnið MeistaraDeildin er ikki nýtt. Frá 1942 til 1975 kallaðist besta deildin hjá monnum meistaradeildin. Tað er eitt tilvitað val, at deildin ikki longur eitur navnið hjá einum stuðli, tí nú er navnið hjá deildini ikki tengt at einari ávísari stuðulsavtalu ella stuðli, og soleiðis verður framtíðartryggjað, at deildin eitur sama navn óansæð hvør stuðlar henni.

Fleiri onnur nøvn vóru uppi at venda, men mett var, at navnið MeistaraDeildin hóskar seg best og hevur ta tign, sum deildin hevur uppiborið.

## ÍBLÁSTUR ÚR FØROYSKU NÁTTÚRUNI

Grafiski samleikin hevur sín uppruna í føroysku náttúruni. Tindar, berg, veður og ráa orkan, sum eyðkennir Føroyar, hava verið týðandi íblástur. Somuleiðis hugtøk sum framburður, stremban, styrki og dirvi – virðir, sum eru djúpt rótfast í bæði føroyska samfelagnum og fótbóltinum.

MeistaraDeildin umboðar hægsta stig í føroyskum fótbólti. Tí er samleikin mentur við tí í huga at røkka hæddunum – bæði bókstavliga og myndaliga.

Við ráðgeving frá UEFA, og í samsvari við aðrar stórar landskappingar, sum hava ment sín samleika, hevur búmerkið ikki eina beinleiðis fótbóltsavmynding.

Fótbóltur er heimsins størsta ítróttargrein, og tí er ikki tørvur á at vísa hvussu ein fótbóltur sær út. Heldur eru tað greiðu linjurnar í vakra spælinum, sum ganga aftur í sniðgevingini – saman við styrkini og formunum úr føroysku náttúruni.

## BÚMERKIÐ – STREMBANIN UPP Á TINDARNIR

Búmerkið er sniðgivið við greiðum íblástri frá føroyskum bergi og tindum. Formurin speglar strembanina upp á hægstu tindarnar í fótbólti – viljan at flyta seg fram, yvirvinna mótstøðu og røkka hægsta stigi.

Sniðgevingin er rein og avgjørd. 'M'ið er bygt upp við fáum formum og greiðum linjum, sum geva búmerkinum styrki og sjálvsálit. Heitið "MeistaraDeildin" er eisini serstakt sniðgivið og fylgir somu greiðu linjum. Hetta er við til at skapa ein sterkan og samanhangandi samleika.

## LITIRNIR – MORGUNSÓLIN OG ORKAN

Høvuðslitirnir hava sín íblástur frá rísandi morgunsólini. Hóast hon ofta bert sæst í glottum, rísur hon trúføst og lýsir upp tindarnar. Hesin sami vilji og stremban eyðkennir MeistaraDeildina.

Litirnir ímynda orku, styrki, elegansu, dystargløð, virðing og kenslur. Teir geva samleikanum eina heita og sterka útstráling.

Samstundis er samleikin eisini smidligur. Litspælið kann lættliga laga seg til og spæla saman við litum hjá einstøku feløgunum, uttan at missa sítt egna eyðkenni.

## STUÐLARNIR ERU PARTUR AV SAMLEIKANUM

Sterku stuðlarnir eru ein natúrligur partur av MeistaraDeildini, og í ymiskum grafiskum tilfari, lýsingum, á prenti, í miðlum og øðrum samskifti spæla teir beinleiðis við í samleikanum. Teir verða integreraðir á ein hátt, sum virðir bæði kappingina og teirra leiklut.

Teir tríggir stuðlarnir Bygma Balslev, Føroya Tele og Atlantic Airways síggjast á jøvnum føti í samleikanum hjá MeistaraDeildini.

## EIN SAMLEIKI FYRI FRAMTÍÐINA

MeistaraDeildin er meira enn ein kapping – hon er hægsti pallurin í føroyskum fótbólti. Grafiski samleikin er mentur fyri at undirbyggja júst hetta: eina kapping, sum stendur fyri styrki, dirvi og støðugum framburði.

Við íblástri úr føroysku náttúruni og við eini greiðari, nútímans sniðgeving, hevur MeistaraDeildin fingið ein samleika, sum bæði er staðbundin og framsøkin – og sum skal bera føroyskan fótbólt víðari upp á tindarnar.








*Sjúrður Olsen, stjóri hjá Bygma Balslev*

**“Við hesum kunnu vit stuðla øllum feløgunum, og tað eru vit errin av”**

# Áhugin drívur verkið

***Fyri stjóran, Sjúrð Olsen, og øll starvsfólkini í Bygma Balslev er tað stóri áhugin fyri fótbólti, ið hevur verið viðvirkandi til, at fyritøkan, sum hevur høvuðssæti í Hoyvík, er vorðin ein av høvuðsstuðlunum hjá MeistaraDeildunum hjá kvinnum og monnum***

**– Eg kann ikki lúgva meg frá,** at eg eri AB’ari um ein háls, og nakað av mínari frítíð verður eisini brúkt inni í Vika á Argjum. Í dag eru tað tó serliga synirnir, sum eru meira virknir í felagnum. Men mær dámar eisini væl at fara til dystir í Klaksvík, Gøtu, Runavík og aðrastaðni – eisini tá AB ikki spælir – tí mær dámar væl fótbólt, og eg fylgi væl við, sigur Sjúrður Olsen.

Við árunum er hann eisini komin at kenna nógv fólk í fótbóltsumhvørvinum, og tað ger tað altíð hugaligt at fara til dystir. Tað er fyrst og fremst fyri sjálvan fótbóltin, men eisini fyri at møta øðrum, sum hava líka stóran brennandi áhuga fyri hesari fantastisku ítróttini.

Bygma Balslev er ein stór fyritøka við sterkum virðum, ið veruliga hevur sligið sítt navn fast í føroysku byggi-



vinnuna. Fyritøkan telur í dag fimm deildir: timburdeild, byggibúð, handverkarabúð og gólvdeild, umframt ein modernaðan timburhandil í Vági, Bygma-Suðuroy.

Til so nógv virksemi er neyðugt við ídnum og dugnaligum starvsfólki – og sum frá er liðið, er starvsfólkatalið nú komið upp um 80.

### STUÐULIN TIL MEISTARADEILDINA

Fyri Sjúrð Olsen hevur tað týdning at vera við, har tingini henda. Eisini tá talan er um føroyskan fótbólt á hægsta stigi.

– Tá vit fingu møguleikan at gerast høvuðsstuðul hjá MeistaraDeildini hjá bæði kvinnum og monnum, tóku vit av beinanvegin. Við hesum kunnu vit stuðla øllum feløgunum, og tað eru vit errin av, sigur Sjúrður Olsen, ið væl kennir til tær avbjóðingar, sum fótbóltsfeløgini dagliga stríðast við.

– Eftir nógv ár í fótbóltsumhvørvinum, kennir man til nakað av tí, sum leiðslurnar í feløgunum brúka sína orku uppá. At vit sum fyritøka kunnu hjálpa til, eru vit sjálvandi glað fyri, sigur Sjúrður Olsen.



Eva Skeel Nolsøe,
menningarstjóri í Føroya Tele

# Føroya Tele í liðuppstillingini

"Vit ynskja at vera við til at lyfta føroyskan fótbólt á eitt enn hægri stig"

***Næstu fimm árini verður Føroya Tele fastur partur av liðuppstillingini í MeistaraDeildini hjá bæði kvinnum og monnum. FSF og Føroya Tele hava gjørt stuðulsavtalu, sum er galdandi til ársenda 2030***

**Í liðuppstillingini er hvør spælari ein týðandi partur av dystinum.** Soleiðis er eisini við stuðlunum, og í Føroya Tele fegnast tey um, at verða partur av liðuppstillingini í MeistaraDeildini.

– Fótbólturin er størsta ítróttagrein í Føroyum, og har vilja vit sjálvandi spæla við. Fótbólturin savnar børn, ung og vaksin um alt landið, har tey møtast, mennast og droyma stórt og í Føroya Tele fegnast vit um, at vit kunnu vera við til at stuðla framhaldandi menningini av føroyskum fótbólti.

– Við hesi avtaluni kunnu vit stuðla



iðkarum í øllum aldursbólkum um alt landið og stuðla øllum feløgunum, sum gera eitt stórt arbeiði og skapa eitt trygt umhvørvi hjá børnum og ungum at mennast í, sigur Eva Skeel Nolsøe, menningarstjóri í Føroya Tele.

Føroya Tele hevur í fleiri áratíggju verið ein hornasteinur í øllum samskifti í føroyska samfelagnum, og tey vita tískil væl, hvussu týdningarmikið tað er við tryggum kørmum og miðvísari menning.

– Vit ynskja at vera við til at lyfta føroyskan fótbólt á eitt enn hægri stig. Við okkara stuðli vóna vit at MeistaraDeildin – bæði hjá kvinnum og monnum – kann halda fram at vaksa og styrkjast, sigur Eva Skeel Nolsøe.





"Fótbólturin savnar og knýtir okkum saman uppá tvørs av bæði aldri og landafrøði"

Andrias Sólsker,
sølustjóri hjá Atlantic Airways

# MeistaraDeildin flúgvandi við Atlantic Airways

***Ein av teimum trimum høvuðsstuðlunum hjá MeistaraDeildini er trúfasti stuðulin hjá føroyskum fótbólti, Atlantic Airways***



**Flogfelagið hevur í nógv ár verið dyggur stuðul hjá Fótbóltssambandi Føroya**, og komandi fimm árini verður samstarvið víðkað, og er Atlantic Airways nú eisini vorðið høvuðsstuðul hjá fremstu deildunum.

Tjóðarflogfelagið knýtir Føroyar nærri umheiminum, og við nýggju stuðulsavtaluni verða føroyskur fótbóltur og Atlantic Airways knýtt enn tættari saman.

– Hjá Atlantic Airways vilja vit fegin stuðla góða felagsskapinum, og fótbólturin er nakað, sum savnar og knýtir okkum saman uppá tvørs av bæði aldri og landafrøði. Við stuðulsavtaluni vóna vit, at vit kunnu knýta fótbóltsføroyar enn tættari saman og vera við til at styrkja fremstu deildirnar í Føroyum.

Tað sigur Andrias Sólsker, sølustjóri hjá Atlantic Airways, sum fegnast um nýggju avtaluna.

– Við nýggju stuðulsavtaluni kunnu vit verða við til at geva MeistaraDeildunum hjá bæði kvinnum og monnum luft undir veingirnar, og sostatt vónandi verða við til at lyfta føroyskan lokalfótbólt enn hægri, sigur Andrias Sólsker.

Meistara Deildin

# VÁGAFÓLK VILJA GERA TAÐ BETRI

***Tað var ikki fyrr enn í síðstu sekundunum av kappingarárinum í fjør, at tað gjørdist greitt, at vágamenn yvirlivdu í fremstu deildini hjá monnum. Kvinnurnar vóru hinvegin við aftur í fremstu røð eftir ein stuttan steðg***



*Bjørk Akselsen*

**– Eftir eitt langt og tungt kappingarár, við mótbrekku allan vegin,** var tað ein heilt fantastisk kensla, tá vit aftaná dystin í 27. umfari fingu at vita, at vit yvirlivdu. Vit hoyra heima í MeistaraDeildini, og eg fegnist um, at vit aftur í 2026 kunnu geva okkara fantastisku áskoðarum fótbólt í bestu deildini. 2025 var als ikki góðkent, so málið er einfalt. Vit skulu klára okkum betri í ár enn í fjør.

Orðini eigur miðverjin, Jónas Prior, sum er ein av ungu evnaríku spælarunum hjá 07 Vestur, og sum fegnast um, at sami venjari verður aftur í ár.

– At Schjønberg heldur fram hevur øgiliga nógv at siga fyri okkum øll. Hann hevur verið her fyrr og kennir felagið væl. Hann leggur nógv fyri at fáa tingini at rigga hjá 07 vestur.



*Jónas Prior*

> **“Schjønberg hevur verið her fyrr og kennir felagið væl. Hann leggur nógv fyri at fáa tingini at rigga hjá 07 Vestur”**

Tað gevur samstundis felagnum nakað av støðufesti at venjarin heldur fram, men útskiftingin í hópinum er stór, har nógvir spælarar eru annaðhvørt givnir ella hava valt aðrar leiðir.

– Vit hava klárað at hildi fast í nakrar av teimun týdningarmiklastu monnunum á liðnum. og tað hevur stóran týdning fyri okkum. Eisini hava vit nógvar góðar, ungar, lokalar spælarar, sum vónandi sláa til í ár. Við tíðini koma vit vónandi at hava eina lokala stammu.

Í landsliðshøpi hava boð eisini verið eftir Jónasi, og í fjør fekk hann sínar fyrstu minuttir á U21 landsliðnum. Hetta gevur honum hug til enn meira.

– Dreymurin er at fáa møguleikan uttanlands, men eg veit eisini, at tað skal hart arbeiðið til. Tí skal eg menna meg enn meira og fáa so nógvar minuttir í beinini sum gjørligt, og harvið kunna geva mítt íkast til, at felagið fær eitt so gott úrslit sum gjørligt. Hesar royndirnar kunnu vónandi geva mær fleiri minuttir á U21 og møguleikan at fara uttanlands, sigur Jónas Prior at enda.

## KVINNURNAR BYGGJA VÍÐARI – VIÐ BRASILSKARI TILGONGD

Eftir ein steðg í bestu deildini, vóru vágakvinnur aftur at síggja í fremstu røð í fjør. Nógvir ungir, lokalir spælarar myndaðu liðið, sum stríddist í niðara endaspælinum.

> **“Tað hevur nógv at siga at spæla í bestu deildini, tí vit eru í einari uppbyggingar tilgongd, og fyri at fáa góðar leikarar og menna teir leikarar, ið longu eru, eru neyðugt at spæla móti góðum liðum”**

– Tað hevur nógv at siga fyri okkum at spæla í bestu deildini, tí vit eru í einari uppbyggingar tilgongd, og fyri at fáa góðar leikarar og menna teir leikarar, ið longu eru, eru neyðugt at spæla móti góðum liðum. Tað er eisini stuttligari at spæla, tá man fær nógva og harða mótstøðu.

Soleiðis sigur Bjørk Akselsen, sum seinni í ár verður 18 ár. Eins og menninir, so vilja tær standa seg betri í ár, í mun til í fjør.

– Vit vilja byggja eitt sterkt og stabilt lið upp, har vit arbeiða hart og gera okkara besta, sigur Bjørk, sum samstundis fegnast um at hava fingið tveir av brasilsku spælarunum vestur aftur.

Tær báðar – Evelin Da Silva Mastropasqua og Katlyn Soares – hava báðar gjørt sáttmála við 07 Vestur. Tá tær fyri seks árum síðani komu til Føroya at royna seg, var tað eisini í 07 Vesturi, at tær fingu møguleikan. Síðani hava báðar verið í øðrum feløgum, men nú eru tær aftur á Dungasandi.

– Vit eru ógvuliga glaðar fyri at fáa tær vestur aftur. Tað er altíð gott at fáa fleiri leikarar til liðið. Serliga tá leikararnir eru dugnaligar og raskar sum tær báðar eru – samstundis sum tær altíð eru í góðum lag og lyfta lagið í hópinum, sigur Bjørk Akselsen at enda.

# NÝGGIR VINDAR Í SARPUGERÐI

***Víkingur er felagsskapurin fleiri øvunda. Men nú merkjast nýggir vindar í Sarpugerði. Kvinnuliðið hevur sett venjara fulla tíð, meðan mansliðið hevur slakað í stuttflutta leistinum***



*Anna Jørginsdóttir*

**Sigur tú Víking,** so sigur tú felagsskapurin við lokalu kreftunum og eygagóða leistinum við at menna sítt egna. Hetta gongur til eitt vist. Felagið hevur nú leitað uttanlands eftir nýggjum venjara til kvinnurnar, meðan mansliðið hevur broytt strategi í sambandi við tilgongd.

Víkingur hevur sett 32 ára gomlu Eilish McSorley sum venjara hjá kvinnunum fulla tíð. Hon er fyrrverandi skotskur landsliðsspælari og hevur millum annað spælt við Glasgow City, Sassuolo Í Italia og Vånsterås í Svøríki. Hon hevur eina bachelor í ítrótti og B-venjaraprógv. Eilish McSorley hevur eisini havt egið fótbóltsakademi, og verið venjari hjá FC Girvan U20 monnum.

> **“Hjá okkum inniber tað, at onkur fær møguleikan og tekur av. Vit koyra við sama leisti í Víkingi, maður kemur í mans stað”**




*Bárður á Reynatrøð*

– Hon tykist dugnalig og skilagóð. Hon kemur við nýggjum hugskotum og einari greiðari ætlan og greiðum krøvum. Eg ivist ikki í, at vit kunnu menna okkum øgiliga nógv, bæði sum lið og einstaklingar, sigur Anna Jørginsdóttir, sum í ár fer at stríðast á miðvøllinum hjá teimum ljósabláu

Miðvallarin gleðist um, at tað eru komnar nýggjar kreftir á liðið. Millum annað eru Jonnhild á Sondum, Rannvá við Streym og Natalia Dansdóttir Olsen allar komnar úr NSÍ.

– Eg eri ordiliga spent upp á komandi kappingarár. Vit hava eitt gott grundarlag, og vit hava eisini fingið nýggjar kreftir í hópin, so tað skal nokk blíva eitt spennandi og læruríkt kappingarár, sigur unga leirvíkskvinnan.

Víkingur hevur seinastu tvey árini vunnið seg í meistarabólkin og steypafinaluna, men hava ikki rokkið tindunum.

> **“Hon kemur við nýggjum hugskotum og einari greiðari ætlan og greiðum krøvum. Eg ivist ikki í, at vit kunnu menna okkum øgiliga nógv, bæði sum lið og einstaklingar”**

## STÝRIMAÐURIN ER GIVIN

Treytirnar hjá besta kvinnuliðnum eru ikki líka harðar sum hjá mansliðnum. Her er toppfýra vert eitt pláss í Evropa. Tað er her at Víkingur siktar, men í ár verður tað uttan fleiri av profilunum seinnu árini. Umfram at spælarar sum Géza Dávid Turi og Poul Kallsberg eru seldir, meðan Olaf Bárðarson og Ari Olsen hava valt at skifta til útlandið, so hevur Atli Gregersen lagt gaggurnar á hillina.

– Tað merkir, at vit aðrir mugu taka størri ábyrgd. Vit vilja áhaldandi byggja upp á. Hjá okkum inniber tað, at onkur fær møguleikan og tekur av. Vit koyra við sama leisti í Víkingi, maður kemur í mans stað, sigur Bárður á Reynatrøð, landsliðsmálverji.

Víkingur vann steypakappingina í 2022, vann allar dystirnar í seinnu hálvu av 2023 og vann meistaraheitið í 2024. Farna kappingarár gekk minni gott og liðið klóraði seg upp á Evropaplássini.

– Vit hava roynt eitt sindur av hvørjum, sum vit hava lært nógv av. Sjálvandi skalt tú læra av tí góða, og av tí minni góða, men í Víkingi hyggja vit altíð frammeftir. Tað er ongantíð panikkur í, sigur Bárður á Reynatrøð.

Víkingur hevur í ár fingið tilgongd av millum annað danska Mikkel Hyllegaard. Tað er eitt frávik í leistinum við egnum tilfari og eini tráðu á skálafjørðinum. Úrslitini telja nógv og Víkingur skal verða kappingarført.

– Í Víkingi vilja vit altíð spæla við har tað er stuttligt, og tað er at kappast um steyp. Málið er heiðursmerki, sum eisini gevur Evropa-fótbólt. Vit hava eina greiða spæliskipan, har allir kenna sín leiklut. Tá ið vit halda okkum til avtalurnar, so kunnu vit kappast við øll, sigur Bárður á Reynatrøð at enda.

# HB VIL HAVA GULL

***Felagið við stóru gullsiðvenjuni vil hava gullkrúnur í húsið í 2026. Bæði kvinnur og menn fara aftur í ár at kappast um tey fremstu plássini***



*Ási Dam*

**Stóra løtan í HB-húsinum í fjør var helst,** tá ið kvinnurnar óvæntað vunnu steypafinaluna á KÍ. Annars vóru kvinnurnar ikki nær við FM-gullið og menninir luktaðu hvørki til steypagull ella føroyameistaraheitið.

Tey hava tí brynja seg til gullstríð í Havnar Bóltfelag, har kvinnurnar hava sett roynda venjaran, Allan Dybzcak, í starv. Allan hevur seinastu árini verið venjari í NSÍ, har hann bæði hevur vunnið steypakappingina og gullkrónur í landskappingini.

Umframt Allan, so eru Julia Naomi Mortensen, Brá Zachariasardóttir og Sara Samson Shaki komnar úr NSÍ til HB. Síðstnevnda hevur fingið sín fótbóltsuppvøkstur í Gundadali, og hon er fegin um at vera aftur har alt byrjaði.

> ***"Tað er gott at verða aftur í Gundadali. Her havi eg havt nógvar góðar løtur og tað var her alt byrjaði hjá mær"***


*Sara Samson Shaki*

– Tað er gott at verða aftur í Gundadali. Her havi eg havt nógvar góðar løtur og tað var her alt byrjaði hjá mær, sigur Sara, sum eftir trý ár við Løkin í Runavík kendi á sær, at tíðin var búgvin at venda heimaftur.

– Tíðin í NSÍ var fantastisk, men eg ynskti at sleppa aftur til HB. Tær hava eitt sterkt lið – samstundis sum Allan fór til HB – sum er ein venjari, sum mær dámar væl – og so eru tað bara fimm minuttir til gongu hjá mær oman í Gundadal. So hetta kendist rætt fyri meg og passar væl til mín gerandisdag, greiðir Sara frá.

Hóast stuttu leiðina til venjing og í HB húsið, so ætlar Sara ikki at taka sær av løttum nú hon aftur skal spæla í reyð-svarta búnanum. Sara ætlar sær nevniliga eftir gullinum, og tað krevur hart arbeiði.

– Vit fara at gera alt fyri at fáa fatur á gullinum, men vit taka ein dyst í senn og fara inn fyri at vinna hvørjaferð. Sjálvandi ynskja vit at kappast í toppinum, og um tað skal eydnast, so krevst at vit eru væl fyri og tilreiðar, tá kappingin byrjar, sigur Sara Samson Shaki.

> ***"Málið í HB er altíð tað sama. Vit fara altíð eftir at vinna alt. Tað verður torført, men vit vita eisini, at tað ber til"***

## FRÁ ADOLFO TIL ANDRÉ

Eftir eina trilvandi byrjan í 2025, vóru HB'ararnir ikki til at steðga aftur. André Olsen avloysti italiumannin, Adolfo Sormani, og síðani hevur HB ikki tapt í landskappingini.

– Tað var ein stór broyting at fara frá Adolfo til André. Vit fingu nógv meira frælsi at spæla, og tað sást aftur. Fyrst og fremst var verjan stinn, og síðani vóru vit vandamiklir í mótálopunum, greiðir Ási frá.

Ási Dam, sum síðst í árinum verður 24, hevur veruliga sligið sítt navn fast í HB. Eftir eitt hálvt ár í 07 Vestur, har Ási fekk nógva spælitíð og royndir, so hevur hann verður fastur maður í liðuppstillingini hjá felagnum, ið heldur til í norðara enda í Gundadali.

Í fjør var hann eisini liðskipari nakrar dystir, og góðu avrikini gjørdu eisini, at landsliðsvenjarin sendi boð eftir Ása Dam. Hann spældi sín fyrsta A-landsdyst í november, tá Føroyar vunnu 1-0 í venjingardysti ímóti Kasakstan.

– Tað var sera stórt fyri meg at fáa mín fyrsta landsdyst, hóast tað altíð eru onkur viðurskifti, sum kunnu gerast betri. Í ár vil eg fyrst og fremst vinna alt við HB, og síðani vil eg menna meg og avrika væl. Vónandi verður tað nóg mikið til at gerast fastur maður á landsliðnum, sigur fryntligi havnamaðurin.

Eftir eitt ár uttan gull, er svongdin stór hjá Ása og hinum á liðnum.

– Málið í HB er altíð tað sama. Vit fara altíð eftir at vinna alt. Tað verður torført, men vit vita eisini, at tað ber til. Hópurin er góður og vit hava havt eina góða upptakt til kappingarárið, hóast úrslitini í venjingardystunum ikki hava verið góð. Vit eru klárir til kappingarbyrjan, og seinasta tíðin verður brúkt til at fáa teir seinastu smálutirnar uppá pláss, sigur ein spentur Ási Dam.

HB byrjar landskappingina sunnudagin 8. mars. Fyrsti dystur er á útivølli ímóti Skála.

Meistara Deildin

# UNGDÓMURIN ER BULURIN Á SKÁLA

***Skála er í ár aftur umboðað í bestu deildini hjá bæði kvinnum og monnum, og tað er einki at taka seg aftur í, at bulurin á báðum liðunum hjá Skála er lokali ungdómurin***



*Hans Jákup Arngrímsson*

**Manslíðið hjá Skála vann sannførandi næstbestu deildina í fjør,** og nú skal liðið so stríðast fyri at halda sær upp í bestu deildini, í MeistaraDeildini.

## NÝGGJUR MAÐUR Í MÁLINUM

Tað eru fyrst og fremst lokalir leikarar, ið manna liðið hjá Skála, men ein av nýggju leikarunum í hópinum, er gøtumaðurin Hans Jákup Arngrímsson, ið eisini er kendur sum málverji á føroyska U21-landsliðnum.

– Eg eri ógvuliga spentur at royna meg her á Skála. Nú havi eg sitið á beinkinum hjá Víkingi í nøkur ár, og har havi eg staðið aftan fyri annan málverjan á A-landsliðnum, so eg sá ikki ordiliga nakrar møguleikar í nærmastu framtíð í Víkingi, hóast vit høvdu eina sunna kapping, sigur Hans Jákup Arngrímsson.

Hann vildi royna seg í bestu deildini, og tað vónar hann at sleppa á Skála.

– Vit eru tveir málverjar, Suni Ernstsson og eg, so tað er ikki ein sjálvfylgja at eg eigi plássið, sigur U21-landsliðsmálverjin.

Hans Jákup greiðir frá, at hann valdi Skála, tí eftir hansara tykki er tað eitt sunt felag við góðum umstøðum.

– Og so kenni eg eisini fleiri av spælarunum, og tað er tætt upp á heimið hjá mær, sigur Hans Jákup Arngrímsson.

***“Eg eri ógvuliga spentur at royna meg her á Skála. Nú havi eg sitið á beinkinum hjá Víkingi í nøkur ár, og har havi eg staðið aftan fyri annan málverjan á A-landsliðnum”***

## GÓÐAR VÓNIR

Spurdur um vónirnar fyri komandi kappingarár, sigur Hans Jákup Arngrímsson, at hann hevur góðar vónir.

– Tað hevur gingið væl í venjingardystunum, og hópurin tykist breiður og sterkur við serliga nógvum ungum og evnaríkum spælarum. Spurningurin er kanska, um vit hava nóg mikið av royndum, men tað má tíðin vísa, sigur hann.

Hóast málsetningurin í fyrstu atløgu er at yvirliva í deildini, og so kann málsetningurin møguliga regulerast, sum árið líður sambært málverjanum.

## KVINNURNAR MIST LYKLALEIKARA

Eins og á mansliðnum hjá Skála er bulurin á kvinnuliðnum hjá teimum appelsingulu á vestara armi á Skálafjørðinum eisini sera ungur. Men hóast ungan aldur, hava nógvar av teimum roynt seg nokk so leingi á besta liðnum, og ein av teimum er málverjin, Ingrið Berg Rasmussen.

Hóast Ingrið einans er 18 ára gomul, so hevur hon longu spælt oman fyri 70 dystir á besta liðnum, og sum málverji á øllum ungdómslandsliðunum upp gjøgnum aldursbólkarnar er tað heldur eingin ivi um, at Ingrið er ein av stuðulsleikarunum á liðnum hjá Skála.



*Ingrið Berg Rasmussen*

– Vit eru spentar upp á árið, men tað skerst ikki burtur, at tað er ein stórur missur fyri okkum at Sara Benjaminsen er farin til FC Nordsjælland í Danmark at spæla fótbólt, sigur Ingrið Berg Rasmussen.

Um sæð verður burtur frá missinum av Saru Benjaminsen, so hevur Skála á leið sama hóp sum í fjør, tá liðið endaði á 2. plássi í niðara endaspælinum hjá kvinnum.

– Men okkurt nýtt kemur til. Nógvar hava verið til venjing – væl fleiri enn undanfarin ár – og venjingarnar hava sæð gott út, sigur málverjin.

Ingrið Berg Rasmussen greiðir samstundis frá, at gentuliðini hjá Skála hava klárað seg sera væl seinnu árini, og tað eru fleiri av hesum spælarunum, sum nú koma upp á besta liðið.

– So eg vænti eitt gott ár, men sjálvandi eru vit enn við at byggja upp, sigur Ingrið Berg Rasmussen at enda.

***“Eg vænti eitt gott ár, men sjálvandi eru vit enn við at byggja upp”***

Meistara Deildin

# KLAKSVÍKINGAR DROYMA SEG VÍÐARI Í EVROPA

***Menninir royndu tað í 2023 og vilja aftur í ár í eitt evropeiskt deildarspæl. Men í ár ætla kvinnurnar somu leið. Tær hava allar vunnið alt, ið vinnast kann, og ætla nú at vinna seg víðari í Champions League***



*Tórunn Højgaard Joensen*

**“Dette land er for lille for mig”.** Flestu kenna væl kendu orðini hjá Egoni Olsen frá Olsen Banden. Tað kann tykjast, at tað er støðan hjá klaksvíkingum í løtuni, sum hava sett yvirleggjaran høgt og ikki eru nøgdir við “bara” náa føroysku toppunum. Teir vilja meira.

Men at fáa føroyameistaraheitið aftur til Klaksvíkar hevði eisini nógv at siga. Í 2024 gjørdust mæði mansliðið og kvinnuliðið nummar tvey, og tí var tað kærkomið, at tað í fjør aftur eydnaðist at fáa gullið inn um Klakkin.

– Tað hevði ómetaliga nógv at siga fyri okkum at vinna FM-heitið. Tað var eitt prógv uppá tað arbeiðið, sum vit høvdu gjørt gjøgnum alla kappingina, og um styrkina í hópinum. Vit hava sett okkum greið mál, og hvør einstakur í hópinum hevur tikið ábyrgd – bæði á og uttanfyri vøllin. Tað, at vit standa saman sum eitt lið og altíð royna at gera okkara besta fyri hvønn annan, er ein stórur partur av okkara styrki, og tað var eisini ein av høvuðsorsøkunum til at røkka hesum málinum.

Tað sigur Tórunn Højgaard Joensen, sum í fjør vann sítt sætta føroyameistaraheitið fyri KÍ. Stinni bakkurin við gylta vinstrabeininum skoraði 12 mál farna kappingarár, og var ein av mest eyðsýndu spælarunum hjá KÍ.

– Eg eri ein offensivur leikari, hóast eg spæli bakkur. Spæliskipanin, sum vit høvdu í fjør, var eisini sera offensiv, og tað gav mær nógv rúm og møguleikar at koma við fram og taka lut í álopsspælinum. Samstundis kennast vit sera væl á liðnum, og tað ger, at vit finna hvørja aðra lætt í spælinum og megna at spæla hvørja aðra góða.

**“Vit hava sett okkum greið mál, og hvør einstakur í hópinum hevur tikið ábyrgd – bæði á og uttanfyri vøllin”**

– Styrkirnar á liðnum eru eisini so góðar, at eg havi fult álit og gott mót upp á at fara langt fram á vøllin, tí eg veit, at tær, sum eru aftanfyri, eru dugnaligar og taka ábyrgd, um neyðugt. Alt hetta hevði ein stóran leiklut í teimum málstigunum, sum eg fekk í fjør.

Tórunn, sum seinni í ár verður 27 ár, hevur vunnið alt tað, sum vinnast kann í Føroyum. Í ár fara tær eftir at vinna bæði steypini, men Tórunn og hinar í KÍ droyma eisini størri.

– Vit droyma eisini stórt og vilja arbeiða hart fyri at fáa so góð úrslit sum gjørligt í Evropa. Tað er nakað, sum vit fara at geva alt fyri. Vit fara út við vinnaramentanini hjá KÍ-kvinnum í ryggsekkinum, har arbeiðshugur, samanhald og viljin at gera okkara allar besta fyllir nógv. Um vit halda fast í hesum, trúgva vit uppá, at vit røkka langt – bæði heima og uttanlands, sigur Tórunn.

Flyta vit okkum frá kvinnunum í KÍ til menninar, og frá vinstra bakki til høgra bakk, so eru dreymarnir um eitt evropeiskt ævintýr minst líka stórir. Men hóast tað, so hevur Jóannes Kalsø Danielsen bæði beinini á jørðini.

– Tað er eingin loyna, at tað fyllir nógv. Hetta er ein møguleiki, sum vit øll droyma um, men hetta er ikki nakað, sum vit tosa um hvønn dag. Fyrsta treyt fyri at fáa slíkar upplivingar er, at vit klára okkum væl í heimligu kappingini. Eitt møguligt deildarspæl er sjálvandi ein eyka motivation, sum ger tað eyka spennandi, sigur Jóannes, sum í fjør spældi allar 27 dystirnar í landskappingini.



*Jóannes Kalsø Danielsen*

– Vit vilja kappast í øllum, sum vit kunnu kappast í. Dreymurin er sjálvandi at vinna landskappingina, steypakappingina og koma í eitt deildarspæl, men vit vita hvussu fótbóltur er, og hvussu skjótt alt kann broytast.

Bæði menninir og kvinnurnar hjá KÍ byrja á útivølli móti 07 Vestur. Menninir spæla fyrsta dystin sunnudagin 8.mars, meðan Tórunn og hinar KÍ kvinnurnar leggja fyri tvær vikur seinni, sunnudagin 22. mars.

**“Dreymurin er sjálvandi at vinna landskappingina, steypakappingina og koma í eitt deildarspæl, men vit vita hvussu fótbóltur er”**

Meistara Deildin

# HER ER TAÐ STUTTLIGT, HER ER TAÐ GOTT

***Hvíta liðið í Gundadali hevur verið í einum aldudali seinastu árini – bæði menninir og kvinnurnar. Men menningin skal halda fram og hart arbeiði í einum góðum felagsskapi er lykilin hjá B36***



Dávid Biskopstø Andreasen

***“Sjálvandi skal B36 verða eitt lið, sum kappast og spælir við um tey evropeisku plássini”***

**Tað eru øðrvísi tíðir í B36.** Seinasta føroyameistaraheitið kom í hús í 2015, og í '18 vann felagið steypakappingina. Men síðani hevur tað verið soltið við medaljum og steypum í B36.

Men til komandi kappingarár hevur árstalsfelagið fingið ein nýggjan mann í Gundadal, sum hevur vunnið nógv. Talan er um Dávid Biskopstø Andreasen, sum í vetur hevur skift kongabláu KÍ troyggjuna út við tað hvítu hjá B36. Í Klaksvík hevði Dávid tó ilt við at fáa nóg nógva spælitíð.

– Tað hevur verið ein stór, men eisini spennandi broyting. Í KÍ eru krøvini sera høg hvønn dag. Tað hevur lært meg nógv, bæði fótbóltsliga og mentalt. Í B36 er støðan sjálvandi eitt sindur øðrvísi. Her snýr tað seg meira um at byggja nakað upp, seta eitt nýtt grundarlag og menna liðið yvir tíð. Hetta er eitt spennandi projekt. So hóast krøvini eru øðrvísi, eru tey framvegis høg og eg trívist væl í tí umhvørvinum, sigur ungi klaksvíkingurin, ið vísir á, at tað hevur havt stóran týdning at finna eitt felag, har hann fær ábyrgd og spælitíð. Hann vónar samstundis, at B36 kann flyta seg longur upp á stigatalvuni.

– Vit byggja víðari á tað grundarlagið, sum er lagt. Vit ynskja at vera eitt lið, sum er væl skipað, arbeiðir hart og er torført at spæla ímóti. Og sjálvandi skal B36 verða eitt lið, sum kappast og spælir við um tey evropeisku plássini, sigur Dávid, ið nú hevur heimavøll í Gundadali.

## KVINNURNAR ÆTLA Í OVARA ENDASPÆLIÐ

Kvinnurnar í B36 vunnu í fjør bæði minnu steypakappingina og niðara endaspælið. Men í ár ætla tær meira.

– Vit hava ment okkum nógv, hóast vit seinastu árini hava mist nógvar spælarar. Vit eru enn í einari uppbygging og vit vilja byggja nakað stórt. Fyrst og fremst skulu vit framhaldandi skapa eitt mennandi umhvørvið, sum er ein tryggur og stuttligur felagsskapur fyri spælararnar at vera í - so skulu úrslitini nokk koma.

***“Vit hava fingið eina tilgongd av leikarum, sum eru sera dugnaligar og óførar, og tær styrkja eisini væl um hópin”***



Ester Ellingsgaard

Tað sigur ein av stuðulsleikarunum seinastu árini, Ester Ellingsgaard. Hóast hon bara er 21 ár, so er hon ein av royndu spælarunum á unga B36 liðnum. Hon gleðist tí um, at venjaratoymið framvegis er tað sama.

– Vit eru ótrúliga glaðar fyri venjaratoymið. Tað er eitt ordiliga gott “match” fyri okkum. Í fjør arbeiddu vit hart og nógv við spælistílinum, og tað kunnu vit byggja víðari á, sigur Ester, sum leggur afturat, at vit í ár skulu vænta at síggja tær í ovara endaspælinum.

– Vit hava fingið eina tilgongd av leikarum, sum eru sera dugnaligar og óførar, og tær styrkja eisini væl um hópin. Til hvørja venjing verður arbeitt harðari, og leikarar koma at venja fyri at læra og spæla saman. Ætlanin eru avgjørt at koma í ovara endaspælið. Eg trúgvi uppá, at um vit halda fram, sum vit gera nú, so eru vit sjálvandi eitt lið, sum fer at kappast í toppinum um nøkur ár, sigur Ester Ellingsgaard at enda.

Fyri menninar hjá B36 byrjar landskappingin á heimavølli sunnudagin 8. mars, tá EB/Streymur kemur á vitjan. Fyrsti dystur hjá kvinnunum verður tvær vikur seinni, sunnudagin 22. mars, á útivølli móti Víkingi.

NSÍ Runavík Football Club 1957 | Meistara Deildin

# PÍLARNIR Í RUNAVÍK PEIKA HVØR SÍN VEG

***Tað var nær við hjá runavíkingum í fjør. Kvinnurnar stríddust til tað allarsíðsta um FM, meðan menninir leingi vóru væl við í stríðnum um gullkrúnurnar. Í ár peika pílarnir tó hvør sín veg***



*Dania Serafia Andrassdóttir*

**Tær vóru bara trý stig frá FM.** Men í løtuni er lítið, ið bendir á, at soleiðis fer at verða aftur í ár, Hópurin hjá NSÍ kvinnunum er ikki tann sami sum farna kappingarár. Frágongdin hevur verið stór, og tí eru tær eisini greiðar yvir, at tær neyvan fara at kappast í oddanum.

– Vit eru realistiskar og vita væl, at vit ikki fara at kappast um FM. Men vit fara at spæla eitt nýtt lið saman, so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur. Vit vilja sjálvandi verða so ovaliga á stigatalvuni sum gjørligt.

Tað sigur Dania Serafia Andrassdóttir, sum er ein av royndu spælarunum hjá NSÍ. Stóra útskiftingin frá 2025 ger, at tað nærum verður eitt nýtt NSÍ lið í ár.

> ***"Fyrst og fremst skal eg hjálpa liðnum við mínum leiðaraevnum og royndum. Harumframt liggur ein ávís ábyrgd á mær"***



*Viljormur Davidsen*

– Tað eru bara eini tríggjar-fýra av teimum 11, sum byrjaðu inni í fjør, sum eru eftir í hópinum. Hinvegin eru fleiri royndir spælarar, sum hava spælt í bestu deildini, sum eru klárar at traðka til, og fáa møguleikan at fáa ein størri leiklut á liðnum í ár.

– Stóra útskiftingin ger, at vit mugu byrja av nýggjum við lokalum spælarum. Vit hava fleiri ungar spælarar, sum nú hava aldur at spæla í bestu deildini. Tað verður tí ein blanding av ungum óroyndum spælarum og royndum spælarum, sum fara at mynda hópin í ár.

Dania hevur í fleiri ár verið ein av stuðulsleikarunum hjá NSÍ, og hon avgjørdi eisini steypafinaluna í 2023, tá hon í longdu leiktíðini skoraði uppá brotsspark. Hon er tilreiðar at taka enn eitt tak fyri vespurnar, hóast tað nú liggur ein størri ábyrgd á henni.

– Vit eru nakrar, ið eru komnar upp í árini og sum hava spælt í bestu deildini í nógv ár. Tá fylgir ein størri ábyrgd við, so tað er ein uppgáva, vit eldru skulu lyfta í felag, sigur Dania at enda.

## VILJORMUR ER KOMIN HEIM

Gleðin var stór á runavíkingum, tá NSÍ tíðliga í vetur kunngjørdi, at Viljormur Davidsen hevði gjørt ein trý ára sáttmála felagið. Hann fór sum unglingi til Danmarkar at spæla, og eftir tíggju ár í útlendskum fótbólti og trý ár í HB, gjørdi 34 ára gamli verjuleikarin sáttmála við barndómsfelagið.

> ***"Stóra útskiftingin ger, at vit mugu byrja av nýggjum við lokalum spælarum. Vit hava fleiri ungar spælarar, sum nú hava aldur at spæla í bestu deildini"***

– Tað er deiligt at vera aftur við Løkin. Øll hava tikið væl ímóti mær, og vit hava eitt spennandi ár fyri framman.

Dámligi vinstribakkurin, sum seinastu árini eisini hevur víst sínar dygdir í miðverjuni, fer ikki á flog, hóast nógv verður tosað um at NSÍ aftur skal kappast um gullheiðursmerkir.

– Fyrst og fremst skal eg hjálpa liðnum við mínum leiðaraevnum og royndum. Harumframt liggur ein ávís ábyrgd á mær, og so skal eg bara spæla sum eg altíð havi gjørt, sigur Viljormur, sum í heyst kom uppá tilsamans 91 A-landsdystir fyri Føroyar.

Viljormur Davidsen hevur vunnið Løgmanssteypið tvær ferðir fyri HB – har hann í báðum finalunum spældi ein stóran leiklut – eigur tó framvegis sítt fyrsta føroyameistaraheiti til góðar.

– Vit fara at gera alt fyri at koma tættari at 1. plássinum. Tó skulu vit fyrst fremst byggja uppá tað góða frá í fjør, og hava fokus á at gerast betri. Hóast vit ikki hava sett FM sum eitt ítøkiligt mál, so er hópurin fullur av svongum monnum, sum vilja vinna okkurt steyp. So tað má altíð verða málið, sigur Viljormur, sum gleðir seg til aftur at spæla í gula búnanum.

# FC HOYVÍK LEITAR EFTIR GRUNDFESTINUM

***Nógv er broytt tey seinastu tíggju árini í felagnum, sum í dag eitur FC Hoyvík. Men málsetningurin um at finna støðufesti er enn tann sami***



Rókur Kollsker

**Í nógvar mátar líkist FC Hoyvík sær sjálvum.** Besta mansliðið roynir at finna støðufesti í næstbestu deildini, og umstøðurnar kring vøllin eru ikki góðar. FC Hoyvík hevur tó funnið sín samleika, eftir at hava verið ein samanrenning av Fram, fyrstu versiónini av FC Hoyvík og FF Giza.

Í dag eitur felagið FC Hoyvík og spælir í svørtum og reyðum. Vøllurin í Hoyvík er heimstaðurin hjá felagnum. Fyribils byngjurnar eru ikki so fyribils og tað legst afturat við ungdómi. Størsta menning sæst á kvinnusíðuni, har FC Hoyvík hevur lið í bestu deildini og mennir ungdómslandsliðsspælarar.

Tað er helst ein spurningur um tíð, áðrenn FC Hoyvík verður ein størri partur av heildarmyndini í vaksnamannafótbólti í Føroyum. Dreymurin var at eftirlíkna H71, men tað er kanska at sikta ov høgt í fyrstu atløgu.

## KVINNURNAR Í MENNING

Hetta er meinlíkt boðskapinum í fjør. Besta kvinnuliðið hjá FC Hoyvík stendur í menning, men enn er felagið ikki kappingarført. Tað kann gera, at bestu spælararnir onkuntíð fara í onnur feløg, tá eginleikar og avbjóðingar ikki standa mát. Tað blívur eisini torført at lokka spælarar til, men nú sær betri út.

– Eg síggi fram til hetta kappingarárið. Tað verður eitt spennandi, men eisini avbjóðandi ár fyri okkum. Vit eru í einari uppbygging, har nógv er broytt síðani síðsta ár, og tí vita vit eisini, at tað fer at krevja arbeiði og tol. Men vit eru ágrýtnar og motiveraðar til at kempa fyri tí, sigur Sissal Poulsen, sum sjálv kom til felagið í fjør frá TB/FCS/Royn.

Í fjør yvirlivdi felagið við einum 1-0 sigri á ÍF í upp- og niðurflytingardystinum. FC Hoyvík endaði aftast í B-bólkinum, men tað er við framtíðini í huga, at Verner Restorff Olsen, venjari, fer í gongd við sítt arbeiði.

– Vit eru byrjaði av nýggjum og tað kemur ikki uttan avbjóðingar, men við sterkum felagskapi og vilja koma vit langt. Vit fara eftir at byggja eitt nýtt lið við spælarum, sum síggja eina framtíð í felagnum, sigur nýggi venjarin, ið sigur at málið er at yvirliva í MeistaraDeildini. Fyri Sissal er tað eisini framgongd.

– Eitt góðkent kappingarár fyri meg er, at vit síggja framgongd, bæði sum lið og einstaklingar. Um vit megna at mennast gjøgnum árið, spæla við góðum hugburði og byggja eitt sterkt grundarlag til framtíðina, so eri

***"Tað eru nógv nýggj andlit í hópinum, so vit skulu læra hvønn annan at kenna"***

eg nøgd, óðansæð hvat úrslitið endar við, sigur Sissal Poulsen.

Bæði nevna hvussu týdningarmikil felagsskapin er. FC Hoyvík er í eini støðu, har úrslitini kunnu verða ein tung mótbrekka, men tá skal samanhaldið dríva verkið.

## SØGAN ENDURTEKUR SEG

Hjá besta mansliðnum endurtekur søgan seg. Upp og niðurflyting millum 1. deild og 2. deild. Í fjør vann FC Hoyvík sær uppflyting. Nýggjur venjari er Zora Vujovic, sum fyrr hevur staðið á odda fyri besta kvinnuliðnum.

Tað er ikki óvanligt, at spælarar úr hinum feløgunum í høvuðsstaðnum koma til Hoyvíkar at spæla. Ein teirra er 20 ára gamli Rókur Kollsker. Hann kom til felagið frá B36 í fjør. Rókur fekk flestar minuttir á vøllinum av øllum farna kappingarár.



Sissal Poulsen

– Vit vita væl at støði er væl hægri enn í fjør. Tí venja vit hart og gott. Tað eru nógv nýggj andlit í hópinum, so vit skulu læra hvønn annan at kenna. Hópurin er breiddri enn í fjør, sum er sera týdningarmikið fyri eitt langt ár, sigur Rókur Kollsker.

Málið er at vinna sær fast pláss í næstbestu deildini. Tað hevur tað leingi verið í FC Hoyvík, og tað er ein eins stórur dreymur at fáa betri umstøður. Men tað verður fyribils av ongum.

– Umstøðurnar kundu verið munandi betri. Tað er harmiligt, at kommunan enn einaferð hevur valt at niðurraðfesta fótbóltin í Hoyvíkini. Enn húsast vit í byngjum, sum á sinnið bert skuldu vera fyribils, leggur Rókur Kollsker afturat.

FC Hoyvík hevur í fleiri ár havt økt virksemi í ungdómsdeildunum. Nú er bara ein spurningur um tíð, áðrenn tað sæst aftur á føroyska fótbóltskortinum.

***"Vit eru ágrýtnar og motiveraðar til at kempa fyri tí"***

# NÓGVAR BROYTINGAR Á TOFTUM

***Í 2024 vóru toftamenn í veruligum niðurflytingarstríði, men í fjør komu teir trygt í havn og endaðu á einum sætta plássi – júst sum málsetningurin ljóðaði undan kappingarárinum. Í ár vilja teir tó meir, hóast nógvar broytingar***

**Árið í fjør var merkt av einum venjaraskifti mitt í kappingini,** tá Jákup á Borg takkaði fyri seg. Hann hevði tá staðið á odda fyri B68 síðani 2022. Størstu løturnar hjá toftamonnum saman við Jákupi munnu helst verða sigrarnir við Løkin og steypafinalan í 2023.

Fróði Benjaminsen tók yvir eftir Jákup á Borg, og hann fekk eisini góð úrslit ta stuttu tíðina hann hevði ábyrgdina av fremsta mansliðnum hjá sínum bygdamonnum. Tí vónaðu flest øll toftafólk, at landsliðslegendan fór at halda fram í 2026.

Men so var ikki, tí stutt eftir kappingarlok gjørdist greitt, at Fróði Benjaminsen ikki helt fram. Í hansara stað varð føroyski serbin, Alexendar Jovevic settur. Hann kom á fyrsti sinni til Føroyar í 2003, og er síðani vorðin eitt kent andlit í fótbóltsumhvørinum.

Hann er heldur ikki heilt ókendur á Svangaskarði, tí hann var hjálpavenjari í felagnum í 2018 og aftur í 2020 og í 2021.

Umframt broytingina í venjarasessinum, so hava nógvar broytingar eisini verið í hópinum. Tí er tað nærum eitt nýtt B68 lið, sum fer til verka í ár. Jensen-tvíburðarnir, sum í fleiri ár hava myndað liðið, eru farnir uttanlands – umframt fleiri av hinum, sum vóru stuðulsleikarar í fjør. Harafturat er lítið sannlíkt, at Jákup Norðoy Vilhelmsen og Jóhan Josephsen halda fram á Toftum, eftir at teir farna kappingarár vóru leigaðir úr KÍ.

### VILJA LONGUR UPP

Hóast mongu broytingarnar – bæði á og uttanfyri vøllin – so hava uttanmenn á Skálafjørðinum trúgv uppá, at teir kunnu gera tað enn betur, í mun til kappingarárið 2025.

– Vit ynskja altíð at gerast betri, og tí vilja vit sjálvsagt ikki liggja verri fyri enn í fjør. Nýggi hópurin skal byggjast og setast rætt saman, so vit kunnu koma enn longri upp.

Soleiðis sigur ungi og bjartskygdi saltnesmaðurin, Aron Reinert Hansen. Hann hevur seinastu árini verið fastur partur av B68-hópinum og hevur eisini fingið sínar fyrstu minuttir á U21 landsliðnum. Hóast hann er vónríkur, so er hann eisini greiður yvir, at kappingarárið kann gerast trupult.

– Kappingin í ár verður ikki lættari enn í fjør, tí tað hava verið stórar broytingar hjá okkum. Men vit venja hart hvønn dag, og um vit klára at spæla hópin væl saman, so sær gott út.


Aron Reinert Hansen

***"Kappingin í ár verður ikki lættari enn í fjør"***

### UNGUR LYKLALEIKARI Í VERJUNI

21 ára gamli verjuleikarin við eyðkenda hárinum og nummar 25 á rygginum hevur veruliga sligið sítt navn fast millum teir fyrstu 11 hjá B68. Í fjør var hann við í 26 av 27 dystum, har teir flestu vóru frá byrjan. Samstundis er hann ein av lokalu spælarunum á liðnum, sum annars hevur mist fleiri av teimum, sum seinastu árini hava fingið sín fótbóltsuppvøkstur á Svangaskarði.

Góðu avrikini hjá Aroni gjørdu eisini, at Ólavur Mikkelsen sendi boð eftir honum til dystirnar hjá U21 landsliðnum. Aron fekk sínar fyrstu minuttir á U21 landsliðnum móti Fraklandi á heimavølli, tá hann varð skiftur inn seint í dystinum.

Tað hevur eisini givið Aroni Reinert Hansen hug til enn meira.

– Fyrst og fremst vil eg varðveita plássið í byrjanaruppstillingini í B68 og gera mítt besta fyri liðið. Samstundis vil eg mennast sum spælari og persónur, og vónandi fáa enn fleiri minuttir á U21 landsliðnum, sigur Aron at enda, sum gleðir seg til eitt nýtt kappingarár í reyðu troyggjuni.

Aron og hinir í B68 seta hol á MeistaraDeildina á útivølli móti AB fríggjakvøldið 6. mars.



# EB/STREYMUR VIL NÆRKAST HINUM

***Hóast sundalagsmenn endaðu á einum sjeynda plássi í fjør og ongantíð vóru í vanda at flyta niður, so eru teir vónbrotnir um, at tað ikki eydnaðist teimum at halda fast í sætta plássinum***

**Fyrra helvtin av kappingarárinum eydnaðist tó væl,** men í seinnu hálvu høvdu teir bláu og svørtu trupult at fáa sigrarnar heim.

Nógv hevur verið tosað um, at EB/Streymur mestsum steðgaði upp, tá fótfimi senegalesin, Boubacar Dabo, varð seldur til Lincoln Red Imps í Gibraltar.

– Vit mistu sjálvandi ein framúr spælara, men tað er ikki heilt rætt, at sølan av Dabo var orsøkin til keðiligu gongdina. Áðrenn Dabo fór skoraðu vit 17 mál í 16 dystum, meðan vit fingu 13 mál í 11 dystum eftir at Dabo var farin. Hinvegin var tað heldur verjuparturin, ið ikki var nóg stinnur í seinnu hálvu.

Tað sigur vágbingurin, Búi Egilsson, sum í fjør fyri fyrstu ferð umboðaði EB/Streym, eftir at hann hevði spælt í NSÍ síðani 2019.

Í ár er hann tó ikki einasti vágbingurin á liðnum. EB/Streymur og FC Suðuroy hava nevniliga gjørt ein leigusáttmála, sum ger, at Fríði Holm í ár spælir fyri sundalagsmenn.

23 ára gamli Fríði spældi í fjør fyri fyrstu ferð í bestu deildini, og hann gjørdist toppskjútti hjá FC Suðuroy við fýra málum.

– Fríði er ein álopskendur spælari, sum gevur okkum fleiri streingir at spæla uppá, og helst koma nakrir spælarar afturat. Eg ivist onga løtu í, at tá kappingarárið byrjar, so hava vit funnið røttu loysnirnar til aftur at vinna dystir, sigur Búi, sum í fjør var toppskjútti hjá EB/Streymi – saman við Dabo – við sjey málum.


Búi Egilsson

***"Fyrst og fremst taka vit ein dyst í senn"***

### ROYNDUR SKIPARI Á BRÚNNI

Aftur í ár er tað Sigfríður Skaale Clementsen, sum skal stýra sundalagsmonnum. Hetta er fjórða kappingarárið – á hesum sinni – har havnamaðurin stendur á odda fyri EB/Streymi. Sigfríður var eisini venjari hjá EB/Streymi í 2008 – tá liðið vann greipuna – og í 2009.

Fyri Búa og hinar í EB/Streymi hevur tað nógv at siga, at tað er ein royndur maður, sum skal vísa teimum vegin.

– Hann hevur roynt alt sum venjari í føroyskum fótbólti, og hann veit hvat skal til fyri at røkka málunum, sum vit seta okkum. Harafturat hevur Sigfríður ment nógvar spælarar í EB/Streymi, sum nú spæla í øðrum feløgum, sigur Búi Egilsson.

Í ár verður heimavøllurin við Margáir í Streymnesi, har viðhaldsfólkini hjá blásvarta liðnum hava havt nógvar minnisríkar løtur, og har heimaáskoðararnir mangan hava sett sín dám á dystin við stuðlandi og herligum rópum.

30 ára gamli vágbingurin hevur tó bæði beinini á jørðini, tá hann verður spurdur um málsetningin fyri 2026.

– Vit ynskja at fáa fleiri stig enn í fjør. Samstundis vilja vit nærkast topp fimm liðunum. Men fyrst og fremst taka vit ein dyst í senn og byggja víðari uppá tað, ið eydnaðist væl í fjør, sigur Búi Egilsson at enda.

Fyrsti dystur í MeistaraDeildini hjá sundalagsmonnum er í Gundadali ímóti B36, meðan fyrsti heimadystur við Margáir verður 15. mars, tá argjamenn koma á vitjan.

# ARGJAMENN MIÐA EFTIR VARANDI PLÁSSI

***Eftir tvey ár í 1. deild, eru argjamenn aftur í fremstu røð. Men byggjast skal víðari uppá góða arbeiði frá í fjør, samstundis sum málið er at flyta seg frá at vera eitt sokallað "elevatorlið", til at vera fast innbúgv í MeistaraDeildina***

**– Tað verður øðrvísi, samanborið við 1. deild.** Vit eru allir sera spentir og hugagóðir um stóru og spennandi uppgávuna, sum liggur fyri framman. Í fjør løgdu vit serliga stóran dent á at arbeiða við høgari arbeiðsorku og leikferð, við tí í hyggju, at broytingin frá næstbestu deildini til bestu deildini skuldi gerast meira natúrlig. Hetta hevur nevniliga fyrr víst seg at vera avbjóðandi. So vónandi kemur hetta okkum til góðar í ár, nú støðið verður hægri.

Tað sigur Dánjal Danielsen, sum undir leiðslu av Øssuri Hansen skal syrgja fyri, at kappingarárið 2023, sum endaði við niðurflyting fyri AB, ikki verður endurtikið.

Nú eru argjamenn aftur har, sum tað er stuttligt at vera, og ætlanin er eisini at blíva hangandi í MeistaraDeildini komandi árini.

– Fyrst og fremst er málið at varðveita sessin í deildini, samstundis sum vit skulu byggja uppá liðið, sum vit hava í løtuni. Vit skulu flyta okkum frá at vera eitt sokallað "elevatorlið", til at vera fast innbúgv í fremstu deildini hjá monnum, sigur fryntligi argjamaðurin.

Saman við Skála flutti AB upp úr 1. deild farna kappingarár. Felagið á Argjum hevur aftur í ár sett toftamannin, Øssur Hansen at hava ábyrgdina av flaggliðnum hjá AB, samstundis sum liðið er styrkt við nøkrum lokalum spælarum, sum í fjør royndu seg í øðrum feløgum.

Argjamenn eru eisini fult greiðir yvir, at uppgávan í ár verður ein heilt onnur, og tað sæst eisini aftur í fyreikingunum.



Dánjal Danielsen

> "Argir er í stórum vøkstri og skal sjálvandi vera umboðað í bestu deildini"

– Venjingarmongdin er økt munandi, í samanborið við í fjør. Men tað hevur eisini givið okkum møguleikan at venja ítøkiligar smálutir. Vit hava eisini fingið styrk í vetur, ið veruliga hevur hækkað góðskuna á venjingunum, ið samstundis hevur við sær, at kappingin um plássini á liðnum er harðnað.

– Vit koma at síggja eitt arbeiðssamt og orkuríkt lið, sum fer hundrað prosent inn til hvønn dyst. Vit ætla at halda fast í sama leisti, sum riggaði væl í fjør – tó við onkrum smávegis tillagingum, nú vit skulu spæla í fremstu deildini, sigur Dánjal Danielsen, og leggur afturat, at tað merkist í felagnum, at teir eru fluttir upp í MeistaraDeildina.

– Huglagið í AB er sera gott, nú vit endiliga eru fluttir upp. Argir er í stórum vøkstri og skal sjálvandi vera umboðað í bestu deildini. Vit koma frá einum góðum kappingarári í fjør, og eru sera bjartskygdir og hugagóðir um komandi kappingarár, har nógvar stórar og spennandi avbjóðingar eru fyri framman.

– Venjingarumhvørvið inni í Vika á Argjum er eisini serstakliga gott, og tað er altíð stuttligt at møta inn til venjing, samstundis sum vit njóta samveruna aftaná venjingarnar. Hetta haldi eg er sera týdningarmikið, tí stemningurin smittar ikki av á okkum leikarar, men sanniliga eisini á øll onnur í felagnum; bæði tey sum hjálpa til, tey sum stuðla og øll, sum geva sítt íkast til AB.



# FC SUÐUROY VIL UPPAFTUR

***Eftir at hava spælt í næst- og triðbestu deildini seinastu mongu árini kundu vágbingar og sumbingar endiliga síggja sítt fótbóltslið spæla aftur í bestu deildini***



Rasmus Olsen

**Steðgurin gjørdist tó stuttur,** men málsetningurin í ár er greiður: FC Suðuroy skal uppaftur í MeistaraDeildina.

Tað var ikki fyrr enn í seinastu minuttunum at avgerðin fall og tað endaliga varð staðfest, at FC Suðuroy skuldi tungu leiðina niður í 1. deild.

– Tað var sjálvandi bæði tungt og keðiligt at flyta niður aftur. Samstundis haldi eg ikki, at vit kunnu klaga, tí liðið var ungt og lokalt, har størsti parturin av spælarunum vóru úr Vági, sigur málverjin, Rasmus Olsen, sum fyri fyrstu ferð royndi seg í bestu deildini.

Undan kappingarbyrjan vóru tað fá, ið góvu FC Suðuroy nakran møguleika at yvirliva. Men við góðum stríðsvilja og dirvi at spæla fótbólt, vístu teir, at teir avgjørt kundu spæla við á ovastu rók.

– Vit arbeiddu hart, kempaðu og góvu alt, sum vit høvdu í okkum fyri at halda okkum uppi, men tað gekk akkurát ikki. Tað er hart at flyta niður, men vit eru stoltir av avrikinum, sigur Rasmus Olsen.

Eitt, sum eyðkendi FC Suðuroy var, at teir flestu spælararnir ikki høvdu roynt seg áður í bestu deildini. Av teimum 21 spælarunum, sum umboðaðu teir í fjør, so vóru heili 17, sum ikki høvdu verið í bestu deildini fyrr.

– Tað var læruríkt, mennandi og stuttligt at vísa seg fram í bestu deildini. Nærum allir spældu fyri fyrstu ferð, men tað sást ikki aftur, og vit spældu góðan fótbólt, sum vit kunnu vera stoltir av, sigur ungi málverjin, sum eisini varð úttikin á U21-landsliðið í fjør.

Afturat teimum ungu og óroyndu spælarunum vóru Dánjal Godtfred og Salmundur Bech, ið báðir hava drúgvar royndir í bestu deildini. Teir halda báðir fram í FC Suðuroy, sum ætlar sær at flyta uppaftur beinanvegin.

> "Tað var læruríkt, mennandi og stuttligt at vísa seg fram"

## NÝGGJUR VENJARI

Tað verður tó við einum nýggjan venjara á síðulinjuni. Talan er um Markus Thorberg, sum í 2024 var venjari hjá grannunum, TB.

– Vit hava fingið ein nýggjan og sera spennandi venjara, sum vit gleða okkum til at læra betur at kenna. Samstundis eru Hunter Bell og Jimmy Abdul farnir – umframt nakrir av hinum profilunum frá í fjør. So tað fer at merkjast, tí hetta vóru ekstremt góðir spælarar. Men við Markus á odda og við nýggju spælarunum, so haldi eg at framtíðin sær bjørt út.

Hóast steðgurin í bestu deildini gjørdist stuttur og kappingin í 1. deild helst verður hørð, so er eingin ivi hjá Rasmus og hinum í FC Suðuroy. Teir ynskja aftur at sleppa at spæla í MeistaraDeildini.

– Tá man hevur mist so nógvar spælarar, og samstundis fingið nýggjar spælarar í hópin, so tekur tað tíð at samansjóða liðið til eitt nýtt kappingarár. Men hóast tað ikki er eitt krav, at vit skulu flyta upp, so er uppflytingin tó nakað, sum vit arbeiða 100 prosent eftir at náa, sigur 19 ára gamli Rasmus Olsen, sum nú fer undir sítt fjórða kappingarár á besta liðnum hjá FC Suðuroy.

# FRÁ FULLUM STADION TIL “LEYGARDAGSFÓTBÓLT”

***Friður valdar aftur við Stórá í Trongisvági, har TB og Einherjar húsast. Eftir eitt baldrut og krevjandi ár í fremstu deildini, sum endaði við niðurflyting, er málið nú at byggja eitt nýtt, samansjóðað lið upp – í stóran mun við ungum, lokalum tvøramonnum***



**– Áðrenn summarsteðgin riggaði lítið og einki,** og longu tá sá svart út. Í seinnu hálvu fingu vit tó rætta uppá ymiskt, og trúgvin uppá at yvirliva kom spakuliga aftur, og vit vóru eisini alla tíðina við í botnstríðnum. Men tá vit taptu fyri Víkingi í triðseinasta umfari, tá hugsaði eg, at nú er fari.

Orðini eigur Ragnar Joensen úr TB, tá hann í stuttum skal seta orð á kappingarárið 2025, sum tíverri fyri tvørafólk endaði við niðurflyting.

– Vit megnaðu ov sjáldan at lukka dystirnar, hóast vit stóðu í góðari støðu. Tí endaðu vit eisini bara við tveimum sigrum – og tað er alt ov lítið, sigur Ragnar, sum seinni í ár verður 33 ára gamal, og eftirhondini telist millum teir royndu á TB liðnum.

***“Ólavsøkudysturin var fantastiskur. Men nú skulu vit spæla leygardagsfótbólt”***

## BYGGJA VÍÐARI Á SEINNU HÁLVU

At kappingarárið hjá TB var baldrut, sást serliga aftur uttan fyri vøllin. Tá árið byrjaði var venjarakabalin ikki ordiliga gingin upp, og fyrstu dystirnar stóð Karl Øster á odda fyri liðnum.

Men um hálvan juni var danin, Thomas Thinggaard settur í starvið sum høvuðsvenjari hjá TB, og tað verður eisini Thinggaard, ið fer at standa á brúnni aftur í ár, við ungum lokalum dekkarum.

– Í fyrstu atløgu ætla vit at byggja víðari á tað góða arbeiði, sum Thomas kom við. Vit skulu tora betri at spæla bólt, og vit skulu eisini tora betri at geva okkara ungu lokalu spælarum ábyrgd, sigur Ragnar Joensen og leggur tó afturat, at teir fara allarhelst at styrkja liðið við onkrum útlendingi.

## FRÁ ÓLAVSØKUDYSTI TIL “LEYGARDAGSFÓTBÓLT”

Við 13 stigum farna kappingarár gjørdust tvøramenn ov stuttir til at halda sær uppi. Talan gjørdist um tveir sigrar og sjey javnleikir. Annar kom, tá TB heldur óvæntað vann á B36 í ólavsøkudystinum, og frøin á teimum mongu TB fjepparunum, ið høvdu leitað sær norður, var ikki til at taka feil av.

– Ólavsøkudysturin var fantastiskur. Men nú skulu vit spæla leygardagsfótbólt, og tað er nakað heilt annað. Næstbesta deildin fær lítið pláss í miðlunum. Tað er vanliga ikki fyrr enn fá umfør eru eftir av kappingini, at miðlarnir geva deildin ans.

Spurdur, hvussu tað verður at seta seg upp til ein dyst í 1. deild, í mun til at spæla í fremstu deildini, so verður tað eingin trupulleiki, sigur Ragnar Joensen.

– Tað er sjálvandi munur á at spæla í Gundadali klokkan eitt ein illfýsnan leygardag, samanborið við ein ólavsøkudyst fyri fullum stadion. Men motivatiónin er framvegis tann sama.

Fyrsta umfar í 1. deild hjá monnum verður spælt leygardagin 7. mars. Fyrsti túrur hjá Thomasi Thinggaard, Ragnari Joensen og hinum umborð á TB skútuni er á heimavølli móti NSÍ.



# SANDOYINGAR VILJA AFTUR Í FREMSTU RØÐ

***Ikki síðani 2011 hevur B71 verið at sæð í fremstu deildini hjá monnum. Síðani tá hava teir verið heilt nirði í 2. deild og vent, men nú skal tað vera. B71 skal aftur í MeistaraDeildina***



Óli á Reynatúgvu

**Leingi vóru teir gulu í Sandoynni við í stríðnum um uppflyting,** men tá avtornaði vóru teir heili 13 stig frá AB, sum endaði nummar tvey í 1. deild hjá monnum farna kappingarár.

Sandoyingar fóru tó tíðliga í gongd við at gera hópin kláran til komandi kappingarár.

Venjarin, Nichlas Hjertstedt, heldur fram í sessinum – samstundis sum liðið hevur fingið tilgongd av fleiri spælarum.

– Tað er púra greitt hjá okkum, at vit ætla at flyta upp í ár. Nú hava vit ligið á markinum at flyta upp í nøkur ár, og tað fáa vit ikki brúkt til annað enn góðar royndir. Vit mennast og styrjast við árunum og royndunum, og tí hava vit vónir um at tað eydnast hjá okkum á hesum sinni. Vit vita, at mótstøðuliðini eru stinn, og tað hava vit fulla virðing fyri, men tað er ongin ivi um, at vit ætla at lyfta B71 aftur í bestu deildina.

***“B71 er ein mentanarberi í Sandoynni, og gevur oyggjafólkunum nógv at savnast um”***

Tað er 19 ára gamli Óli á Reynatúgvu, ið eigur orðini, sum greitt siga, hvat B71 ætlar sær. Evnaríki miðvallarin spældi sínar fyrstu minuttir á besta liðnum í 2023 og fer tí undir sítt fjórða kappingarár í 1.deild.

– Í fjør taptu vit nakrar av teimum týdningarmiklu seks-stigs dystunum, sum gjørdi, at vit mistu sambandið við bæði oddaliðini. Avrikini vóru óstøðug í eitt tíðarskeið, og vónin er, at vit við meira roynda og styrkta hópinum eru støðufastari og stinnari at avgerða dystirnar til okkara fyrimun, sigur Óli, sum samstundis leggur dent á týdnigin av at hava lið í bestu deildini.

– B71 er ein mentanarberi í Sandoynni, og gevur oyggjafólkunum nógv at savnast um. Tí er tað sera týdningarmikið, at vit sum leikarar geva teimum gleðiligar og spennandi løtur. Nú er nakað fráliðið, síðani vit vóru í fremstu røð, og tí er B71 onkursvegna gloymt í føroyskum fótbólti. Tað hevur tískil sera nógv at siga, at vit royna at seta sandoynna aftur á føroyska fótbóltskortið.

Tað er eingin ivi um, at tað liggur unga manninum nær at fáa barndómsfelagið upp í bestu deildina aftur. Og tá hann verður spurdur um síni persónligu mál, so verða tey mestsum sett til viks, tí B71 er tað týdningarmesta.

– Høvuðsmálið hjá mær er at gerast fastur partur av liðnum og harvið gera mín part, so B71 flytir upp í Meistara-Deildina skjótast tilber. Eg gleðist um, at spæla fyri felagið, sum eg havi verið partur av síðan eg var 6 ára gamal. Samstundis eri eg spentur uppá at royna at flyta bæði meg og B71 fram á leið komandi kappingarár, sigur ein vónríkur Óli á Reynatúgvu at enda.

Óli og hinir á B71 liðnum byrja kappingarári leygardagin 7. mars, tá FC Suðuroy, sum eisini ætlar sær minst annað av uppflytingarplássunum, kemur á vitjan inni í Dal á Sandi.

# ELEVATORTILVERAN SKAL BROYTAST

***Í Fugalfirði er settningurin greiður: ÍF skal upp í MeistaraDeildina, og langtíðarmálið er at felagið aftur verður fastur partur av fremstu deildini hjá monnum***



*Dánjal á Lakjuni*

***"Nú hyggja vit frammeftir við positivum eygum"***

**– Aftaná eitt sera skuffandi ár í fjør,** har vit slett ikki vóru nær við at vera partur av uppflytingarstríðnum, so er málið heilt greitt í ár: Vit fara eftir uppflyting. Men tá tað er sagt, at bleiv í fjør meir satsað uppá U21, sum fuglfirðingar endaðu við at vinna. So einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt.

Tað sigur Dánjal á Lakjuni, ið tekur enn eitt tørn fyri ÍF. Fryntligi fuglfirðingurin, sum seinni í ár verður 36, fekk sínar fyrstu minuttir í fremsta liðnum hjá ÍF í 2007, og fer sostatt undir sítt tjúgunda ár í føroyskum vaksnamannafótbólti.

– Men uppflytingin kemur ikki av sær sjálvum. Vit skulu eisini seta spælarar við, bæði lokalar og spælarar, sum koma aðrastaðni frá, tí tilfeingið í Fugalfirði er ikki so stórt, sigur Dánjal á Lakjuni.

## AVBJÓÐINGAR OG LANGTÍÐARMÁL

Seinast ÍF kappaðist um heiður og æru var kappingarárini 2012 og 2013, tá fuglfirðingar bæði árini endaðu á 2. plássi í fremstu deildini hjá monnum, umframt at liðið um hetta mundið eisini spældi onkrar steypafinalur.

Síðani komu nøkur ár, har ÍF var eitt miðal lið í deildini, áðrenn tað gjørdist til niðurflyting í 2017, og farnu árini hevur tilveran sum eitt sokallað elevatorlið merkt mansliðið hjá ÍF.

Men sambært Dánjali á Lakjuni, so ynskja fuglfirðingar at felagið aftur skal gerast fast inventar í MeistaraDeildini.

– Men tað setir sjálvandi krøv til felagið og øll okkum, ið eru rundan um felagið og liðið. Eg haldi tó at ÍF er á rættari leið nú. Felagið hevur fingið eina støðuga nevnd, tað fíggjarliga er uppá pláss, og ungdómsarbeiðið er eisini gott, sigur Dánjal á Lakjuni.

Dánjal hevur samstundis ilt við at seta orð á, hvat tað er, ið ikki hevur riggað nóg væl farnu árini.

– Tað er eitt sindur ringt at siga – tað er nokk ein blanding av ymiskum viðurskiftum – skeivar ráðfestingar, skeivar avgerðir og manglandi tilfeingið hevur verið ein avbjóðing. Men tað er altíð lætt at vera bakklókur. Nú hyggja vit frammeftir við positivum eygum, sigur Dánjal á Lakjuni, ið aftur í ár fer at stríðast í Fløtugerði í Fuglafirði. Hansara partur liggur so ikki eftir.

Fyrsti dystur hjá ÍF verður leygardagin 7. mars, tá fuglfirðingar fáa vitjan av HB.

# MB BYGGIR Á TRIVNAÐ Á OG UTTANFYRI VØLLIN

***Í Miðvági er nýggjur maður við róðri í fótbóltsfelagnum í bygdini. Fyri hann er avgerandi, at trivnaðurin og menningin av felagnum heldur fram***



**Kristoffur Vidtfeldt**

***"Vit skulu koyra víðari við tí, sum hevur verið í felagnum og byggja víðari á tað"***

**Kristoffur Vidtfeldt er nýggjur formaður í Miðvágs Bóltfelag**, eftir at Marin Elisabeth Vidthfeldt, sum eisini er kona Kristoffur, takkaði fyri seg í nevndini.

– Eg eri blivin formaður aftur eftir at hava verið úr nevndini í nøkur ár. Eg havi verið til skips í eina tíð, men eftir at eg kom í land aftur havi eg tikið eina útbúgving. Samstundis havi eg roynt meg sum venjari í øðrum feløgum hesa tíðini, hóast eg allatíð havi verið ein partur av MB – bæði sum foreldur, spælari og annars har tað hevur verið tørvur á hjálp. MB hevur altíð verið nakað serligt fyri meg, sigur nývaldi formaðurin.

Til aðalfundin hesaferð tók forkvinnan ikki við afturvali, og tí bleiv hetta ein møguleiki hjá Kristoffuri at koma aftur í nevndina.

– Í Miðvágs Bóltfelag stilla tey uppstillaðu ikki upp til ávísar sessir, so sum formanssessin. Men tá nevndin er mannað, er tað nevndin saman, ið finnur útav hvør tekur hvønn post.

– At tað gjørdist eg, sum fekk formanssessin var millum annað tí, at eg havi roynt tað fyrr. Tað er ein postur, sum krevur nakað eyka, og ikki ein postur, ið okkara nevndarlimir sjálvboð taka á seg. Eg veit, at eg kann koma við nøkrum nýggjum, eftir at hava verið virkin í øðrum feløgum og fingið enn meira vitan um, hvussu tey skipa seg. Vónin er, at vit kunnu fáa okkurt gott afturat inn í hetta lítla fótbóltsfelagið, sum vit hava í Miðvági.

Hóast miðvingar neyvan fara at kappast um nøkur gullheiðursmerkir í ár, so hevur nevndin í MB sett sær nøkur mál, ið skulu verða við til at menna felagið víðari.

– Hóast nevndin bert hevur havt ein fund síðani vit blivu vald, so er greitt, at vit øll ynskja, at vit skulu koyra víðari við tí, sum hevur verið í felagnum og byggja víðari á tað. Vit høvdu ikki so nógv lið til kappingar í fjør, men vit vóna, at vit kunnu fáa tilgongd og blíva eitt sindur størri. MB byggir nógv á trivnað á og uttanfyri vøllin. Samstundis sum menningin, sum venjarin hevur sett í gongd, verður styrkt og heldur fram, sigur Kristoffur og leggur afturat, at fysisku karmarnir í felagnum eisini skulu gerast betri.

Seinasta árið hevur ein kendur maður verið partur av felagnum. Navnframi klaksvíkingurin og venjarin, Oddbjørn Joensen, varð í fjør settur sum høvuðsungdómsvenjari.

– Oddbjørn er ein royndur venjari, sum kennir føroyskan fótbólt sera væl. Nevndin valdi í fyrstu atløgu at seta hann í tvey ár. Hann hevur havt ábyrgdina av nærum øllum liðum í felagnum – bæði børn og vaksin. Vit hava havt venjingar í Miðvági og Vestmanna, og tað hevur riggað væl og tí fara vit at halda fast í. Í MB eru vit sera takksom fyri, at Oddbjørn hevur tikið hesa stóru uppgávuna á seg, og komandi tíðina fara vit at seta okkum ítøkilig mál fyri 2026.

– Vit gleða okkum til komandi kappingarár saman við Oddbirni, sum sjálvandi kennir felagið væl nú, sigur Kristoffur Vidtfeldt at enda.

# NÚ ER ROYN BARA BARNAFÓTBÓLTUR

***Royn er eitt av minstu feløgunum í landinum og tað hevur nógvar avbjóðingar við sær. Nú skal ein nýggj nevnd royna at blása nýtt lív í ungdómsarbeiðið***

**Í Hvalba og Sandvík er nógv við tað sama.** Royn roynir at halda lív í fótbóltinum í kommununi, men avbjóðingarnar eru tær somu. Fráflyting, grasvøllurin og tvørliga samstarvið í oynni. Nú er nýggj nevnd og øll, ið manna nevndina, eru spildurnýggj í leiklutinum. Fráflytingin hevur sett sín dám á besta mansliðið, sum nú er tikið úr kappingini.

Glottar eru tó at síggja á Skørðunum. Eitt nú hevur felagið tilmeldað tvey U16 lið við gentum á hálvum vølli, og felagið hevur eisini uppafturtikið samstarvið við skúlan og barnagarðin. Hetta samstarvið eydnaðist framúr í fýra ár, men er dottið niðurfyri seinastu tvey árini.

Á aðalfundi í februar mánaði tók 40 ára gamli Jens Christian Joensen við sum formaður. Eins og hini fýra í nevndini hevur hann børn, sum spæla í felagnum, og tað er har drívmegin liggur. Jens Christian hevur eisini umboðað Royn nakrar ferðir sum spælari og kennir felagið væl.

– Vit eru øll spildurnýggj í hesum leiklutinum. Vit hava onga vaksnamannadeild í ár. Í staðin liggur okkara fokus á at fáa tey ungu at trívast og tíma at spæla fótbólt. Vit ynskja, at fáa fótbóltin at rigga í samstarvi við barnagarðin og skúlan, og annars bara reka felagið víðari, sum tað hevur verið rikið, sigur Jens Christian Joensen.

Seinastu árini hevur Royn roynt at havt eitt manslið, men meginparturin av manningini hevur búð norðanfjørðs. Og sjálvt um felagið fekk fast innivist í 2.deild fyri nøkrum árum síðani, so hevur tað ikki eydnast at byggja víðari upp á tað.

– Tað er ringt at fáa tað at rigga, tá kanska tveir triðingar av spælarunum ikki búgva í oynni. Tað hevði verið ynskiligt at fingið tað at rigga, men eg haldi at ein gongd leið hevði verið at lagt vaksnamannadeildirnar í suðuroynni saman, sigur nýggi formaðurin í Royn.

Hetta samstarvið hevur til tíðir riggað hjá fleiri árgangum í fleiri førum, men samstarvið stendur sjáldan við. Jens Christian Joensen hevur ikki so nógvar viðmerkingar til hví so er, men ynskir bara, at tað verður eitt tilboð til allar spælarar í øllum aldri í Royn.

– Fyri meg er tað ikki so týdningarmikið hvussu tað eitur, bara øll fáa møguleikan at spæla fótbólt og røra seg. Vit eru her mest fyri trivnaðin og góða samanhaldið, sigur hvalbingurin, sum nú stendur á odda fyri Royn.

Í eina tíð hevur Royn – sum er einasta felag í landinum við grasvølli – arbeitt við at fáa graslíkisvøll á Skørðunum í Hvalba. Sjálvt um tað kann hava eina sjarmu, so er hetta ein forðing fyri menningina av felagnum, tí tað er ikki spælandi alt árið.

– Undanfarnu nevndirnar hava arbeitt við málinum og tað fyriliggja tekningar. Vit mugu líka seta okkum inn í støðuna, og sum eg skilji tað er vælvilji í kommununi. Vit arbeiða eisini í løtuni við at fáa ein sparkivøll í Hvalba, sigur Jens Christian Joensen.

Ein sparkivøllur er í Sandvík, og í skúlagarðinum er ein, sum Hvalbiar skúli hevur gjørt av sínum eintingum. Soleiðis kanst tú siga, at nógv er við tað sama í Royn. Árinini av samfelagsgongdini í suðuroynni síggjast, nú besta mansliðið hevur tikið seg úr kappingini, meðan felagið av øllum alvi roynir at halda ungdóminum til og tryggja teimum betri umstøður.



*Jens Christian Joensen*

***“Okkara fokus liggur á at fáa tey ungu at trívast og tíma at spæla fótbólt”***



# MIÐLARNIR TIPPA 2026

Meistaradeildin

BYGMA BALSLEV | FØROYA TELE | ATLANTIC AIRWAYS

**John Andersen**
Televarpið



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | NSÍ | HB |
| 2. | KÍ | KÍ |
| 3. | HB | VÍKINGUR |
| 4. | VÍKINGUR | B36 |
| 5. | B36 | NSÍ |
| 6. | 07 VESTUR | SKÁLA |
| 7. | EB/STR | 07 VESTUR |
| 8. | SKÁLA | FC HOYVÍK |
| 9. | B68 | |
| 10. | AB | |

**Trygvi Absalonsen**
FM1



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | KÍ | KÍ |
| 2. | NSÍ | NSÍ |
| 3. | HB | HB |
| 4. | B36 | VÍKINGUR |
| 5. | VÍKINGUR | B36 |
| 6. | 07 VESTUR | SKÁLA |
| 7. | EB/STR | 07 VESTUR |
| 8. | SKÁLA | FC HOYVÍK |
| 9. | B68 | |
| 10. | AB | |

**Heðin Arge**
Televarpið



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | KÍ | HB |
| 2. | NSÍ | KÍ |
| 3. | HB | VÍKINGUR |
| 4. | B36 | B36 |
| 5. | B68 | NSÍ |
| 6. | VÍKINGUR | 07 VESTUR |
| 7. | 07 VESTUR | SKÁLA |
| 8. | AB | FC HOYVÍK |
| 9. | SKÁLA | |
| 10. | EB/STR | |

**Jákup Ósá**
Norðlýsið og bolt.fo



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | HB | HB |
| 2. | KÍ | KÍ |
| 3. | NSÍ | VÍKINGUR |
| 4. | B36 | NSÍ |
| 5. | VÍKINGUR | SKÁLA |
| 6. | SKÁLA | B36 |
| 7. | 07 VESTUR | 07 VESTUR |
| 8. | EB/STR | FC HOYVÍK |
| 9. | B68 | |
| 10. | AB | |

**Tróndur Arge**
Televarpið og KvF



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | KÍ | KÍ |
| 2. | HB | HB |
| 3. | NSÍ | VÍKINGUR |
| 4. | B36 | NSÍ |
| 5. | VÍKINGUR | B36 |
| 6. | 07 VESTUR | 07 VESTUR |
| 7. | EB/STR | SKÁLA |
| 8. | AB | FC HOYVÍK |
| 9. | B68 | |
| 10. | SKÁLA | |

**Símun Chr. Olsen**
KvF



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | KÍ | KÍ |
| 2. | NSÍ | HB |
| 3. | HB | NSÍ |
| 4. | B36 | VÍKINGUR |
| 5. | VÍKINGUR | B36 |
| 6. | EB/STR | SKÁLA |
| 7. | 07 VESTUR | 07 VESTUR |
| 8. | B68 | FC HOYVÍK |
| 9. | SKÁLA | |
| 10. | AB | |

**Jógvan S. Nolsøe**
KvF



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | HB | HB |
| 2. | KÍ | KÍ |
| 3. | NSÍ | VÍKINGUR |
| 4. | B36 | NSÍ |
| 5. | VÍKINGUR | 07 VESTUR |
| 6. | SKÁLA | B36 |
| 7. | EB/STR | SKÁLA |
| 8. | 07 VESTUR | FC HOYVÍK |
| 9. | B68 | |
| 10. | AB | |

**Rúni á Reynatrøð**
FM1



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | KÍ | KÍ |
| 2. | NSÍ | VÍKINGUR |
| 3. | HB | HB |
| 4. | B36 | NSÍ |
| 5. | VÍKINGUR | B36 |
| 6. | 07 VESTUR | SKÁLA |
| 7. | EB/STR | 07 VESTUR |
| 8. | SKÁLA | FC HOYVÍK |
| 9. | AB | |
| 10. | B68 | |

**Agnar Prestá**
portal.fo / FM1



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | KÍ | HB |
| 2. | HB | KÍ |
| 3. | NSÍ | VÍKINGUR |
| 4. | B36 | NSÍ |
| 5. | VÍKINGUR | 07 VESTUR |
| 6. | EB/STR | B36 |
| 7. | SKÁLA | SKÁLA |
| 8. | B68 | FC HOYVÍK |
| 9. | 07 VESTUR | |
| 10. | AB | |

**Niels Petersen**
Televarpið



| # | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| 1. | KÍ | KÍ |
| 2. | HB | HB |
| 3. | NSÍ | NSÍ |
| 4. | B36 | VÍKINGUR |
| 5. | VÍKINGUR | B36 |
| 6. | 07 VESTUR | 07 VESTUR |
| 7. | B68 | SKÁLA |
| 8. | EB/STR | FC HOYVÍK |
| 9. | SKÁLA | |
| 10. | AB | |

# Jákup elskar at døma

***Jákup Øssurson Mohr hevur tað best, tá hann stendur mitt í rokanum í einum fótbóltsdysti. Hann elskar at døma. Í fjør tók hann eitt stig við dømingini, sum endaði við at hann dømdi steypafinaluna hjá monnum***

Jákup Øssurson Mohr er ítróttarmenniskja inn á bein. Hann er uppvaksin í Fuglafirði, men hevur búð í Runavík í fleiri ár. Hann rennur ikki undan, at hann í dag verður bólkaður sum runavíkingur. Tey eru nokk fleiri, sum kennast við navnið Jákup Øssurson Mohr í sambandi við svimjing. Sum ungur svam hann nógv og gjørdi eisini nógvan ítrótt, men tá knæði fór at bila, bleiv fótbóltsdøming ein møguleiki.

– Eg haldi at eg gjørdi allar ítróttargreinarnar, sum eg kundi tá eg var yngri. Eg spældi eisini fótbólt, men 2015 og 2016 kom ein knæskaði fram aftur. Eg visti eisini, at eg ikki fór at blíva nakar toppspælari, forklárar runavíkingurin.

Pápin er Øssur Mohr, fyrrverandi fótbóltsdómari. Hann hevur um hetta mundi í eina tíð roynt at eggja soninum til at royna dómaraleiðina.

– Eg ringdi til Niklas á Líðarenda, sála, og segði, at eg vildi gjarna royna meg. Hann sendi meg á skeið. Tað hevur bara gingið ein veg síðani tá, sigur 36 ára gamli familjumaðurin.

Jákup Øssurson Mohr fær sín fyrsta dyst í MeistaraDeildini í 2022, men longu í 2020 fær hann fyrstu stóru royndina. Allir dómararnir eru burturstaddir, tá Stórsteypadysturin millum HB og KÍ skal avgreiðast.

– Eg minnist, at dysturin verður úttsettur tvær ferðir og eg bleiv bara meira fjálturstungin, og hugsaði, at nú fór eg ikki at fáa dystin, tí dómararnar vóru komnir aftur. Niklas á Liðarenda helt tó fast í mær og eg dømdi dystin, fortelur hann.




Í fjør fall tað Jákupi Øssurson Mohr í lut at døma steypafinaluni. Hann hevur færri enn 30 dystir í MeistaraDeildini, men sær tað sum eitt álit at fáa steypafinaluna so tíðliga í síni dómaraleið.

## BARA POSITIVAR UPPLIVINGAR

Onkuntíð kann ein spyrja seg sjálvan, hví nakar skal tíma at døma? Vanliga er annar parturin ósamdur, og enntá onkuntíð báðir partar. Pulsurin er høgur og tað er skjótt til illbønirnar.

– Eg taki tað ikki so illa upp, um onkur skeldar. Eg havi vant ítrótt til tá tú bæði bløðir og spýr, og eg spældi eisini hart sum spælari, so eg skilji tann partin. Eg haldi bara tað er hugnaligt. Sjálvt um tú ikki ert í einum felagi, so ert tú í einum felagskapi og kemur út kring landið, sigur Jákup Øssurson Mohr.

Fuglfirðingurin í Runavík hevur tað gott við floytuni í hondini. Hann dugur at vera róligur í rokaligum umstøðum. Tað stavar eisini frá arbeiðsplássinum, har hann er løgreglumaður.

– Tað ljóðar eitt sindur býtt, men eg tími ordiliga væl at døma. Um eg skal nevna nakra avboðing, so er tað at verða róligur. Sum dómari kanst tú ikki øsa teg, sum tá tú ert spælari. Og tú kanst ikki svara aftur, tað riggar ikki, sigur Jákup Øssurson Mohr.

Hann sigur eisini, at tað lættasta er at viðurkenna, tá tú hevur dømt skeivt. Vit eru øll menniskju.




*Jákup Øssurson Mohr*

> ***"Tað gongur skjótari fyri seg, tá tú stendur á vøllinum við floytuni og skal hava skil á øllum"***

Jákup er kropsliga væl fyri og hevur lagt nógv fyri seinastu árini at økja renniorkuna. Fyrrverandi svimjarin fann skjótt útav, at tað mátti til, um hann skuldi døma. Tað er eisini munur á at spæla og at døma.

– Tá eg spældi í 2. deild helt eg at alt gekk seint fyri seg, men tá tú stendur í miðringinum við floytuni finnur tú útav, at tað ikki er so lætt. Tað hendir so nógv, at eg mátti finna mær mannagongdir, so eg ikki missi spælarar vekk, ella hvar frísparkið var og so framvegis. Sjálvt í 2. deild skalt tú venja teg við leikferðina, sigur Jákup Øssurson Mohr og leggur afturat við einum smíli:

– Tað gongur skjótari fyri seg, tá tú stendur á vøllinum við floytuni og skal hava skil á øllum, enn tá tú bara situr á síðulinjuni og hyggur.

Seinasta árið hevur Jákup lagt nógv fyri at blíva betri. Bæði kropsliga og viðvíkjandi fyrireiking til dystir. Hann hugsar mest um at døma í Føroyum og tað passar honum fínt.

– Eg skuldi døma í OBOS-liguni í Noregi í fjør, men veðrið gjørdi, at vit ikki fóru avstað. Eg eri kanska nakað gamal at hugsa um FIFA-døming, men í fjør var eg á skeið í Sveis, og vit hava vant við komandi FIFA-dómarum, fyri at síggja hvat skal til, sigur 36 ára gamli familjupápin.

## FAMILJAN BLEIV ÁVARAÐ

Jákup Øssurson Mohr er giftur við Beintu Svensson Mohr. Tey hava trý børn. Tvíburar sum eru 8 ár, og ein drong, sum er fimm ár. Tey vóru øll spent, tá Jákup skuldi døma sín fyrsta dyst í MeistaraDeildini. Tað var 8. august í 2022 á Argjum, har KÍ var á vitjan.

– Familjan kom við út á Argir, men eg hevði sagt við konuna, at hon skuldi ikki lurta eftir áskoðarunum, um teir fóru at rópa eftir mær. Har var nakað av fjálti á mær, men tá eg bríkslaði dystin í gongd var alt ókey, minnist Jákup Øssurson Mohr.

Hann fekk seg skjótt royndan, tí longu aftaná sjey minuttir skal fyrsta stóra avgerðin takast. Mads Boe Mikkelsen úr KÍ og málverjin hjá AB, Rói Zachariassen bresta saman. Mads Boe Mikkelsen fær gult kort.

– Tá eg sá tað umaftur, so skuldi tað kanska verið reytt kort. Men eg missi ikki móti av slíkum hendingum, men fái áræði at gera tað betri til næstu ferð. Handan dagin lærdi eg so, at tað gongur enn skjótari fyri seg í MeistaraDeildini, sigur dómarin brosandi.

Nakrir av royndastu dómarunum eru givnir seinastu árini, meðan aðrir taka eitt kappingarár í senn. Tí kemur tað væl við í FSF, at yngri dómarar sum Jákup Øssurson Mohr taka yvir og vísa so stórt áræði at døma.

## MÁLBRÚK OG DRÁL

Á hvørjum ári savnast allir dómararnir og gjøgnumganga komandi kappingarár. Í Føroyum koma reglubroytingar í gildi við kappingarbyrjan, men mangan eru teir longu settir í verk altjóða eitt hálvt ár frammanundan.

Soleiðis er eisini í ár við nýggju reglugerðini um drál hjá málverjanum. Í dag sært tú javnan dómaran standa og telja við fingrunum upp í loft, tá málverjin hevur bóltin í brotsteiginum. Tað fert tú eisini at gera í Føroyum í ár.

– Nú kann málverjin bara hava bóltin í átta sekund, eftir at hann hevur fingið tamarhald á honum. Vit byrja við at telja innantanna, men tá fimm sekund eru eftir vísa vit tað. Hetta er nakað, sum áskoðararnir koma at leggja merki til í ár í mun til undanfarnu árini, forklárar Jákup Øssurson Mohr.

Í fjør var tað reglugerðin um, at bara liðskiparin kann tosa við dómaran, og tí verður hildið fast í. Hóast dómararnir ikki hava havt sína samling enn, so væntar Jákup at eitt evni verður taklingar.

– Tað er taklingar, sum einki hava við fótbólt at gera. Eitt nú beinspenn aftanífrá, uttan at royna eftir bóltinum. Vit hava onkur dømi frá í fjør, har tað kundi kanska verið reytt í staðin fyri gult kort, heldur Jákup Øssurson Mohr fyri, og leggur at enda afturat:

– Eg elski at døma. Eg gleði meg til komandi kappingarár. Eisini til dystirnar í hinum deildunum. Og onkuntíð er tað verri at døma eina botnuppgerð enn eina toppuppgerð. Tað kann vera eins spennandi.

# Skulu byggja víðari á góðu gongdina

***Tað kundi næstan ikki gingið betri hjá kvinnulandsliðnum í 2025. Tíggju stig í Nations League, sum samstundis gjørdist besta árið nakrantíð. Í ár bíðar ein HM undankapping, har Grikkaland og Georgia eru í bólki við Føroyum***



**Fyri einum ári síðani sat Pætur Smith Clementsen í venjarasessinum hjá føroyska kvinnulandsliðnum.** Tá var tað sum fyribils venjari, tí leitað varð eftir einum avloysara fyri Signe Pries Andersen, sum gavst í starvinum við ársenda 2024.

Men Pætur bleiv bitin av spennandi avbjóðingini, og varð á sumri í fjør settur sum landsliðsvenjari til ársenda 2029. Samstundis takkaði hann fyri seg sum tekniskur stjóri í Fótbóltssambandi Føroya, eitt starv, ið hann hevði røkt seinastu tíggju árini.

– Vit vóru í einari støðu, har vit skuldu finna útav, hvussu vit skuldu gera. Mær dámdi øgiliga væl tíðina sum fyribils venjari og tað gekk væl. Tá so møguleikin kom at fara í fast starv, so var eg skjótur at taka av, hóast tað er eitt ótrygt starv, tí í fótbóltsheiminum kann tað ganga skjótt báðar vegir. Men eg merkti, at hetta var ein ov stórur møguleiki at lata fara.





Tað sigur landsliðsvenjarin, tá hann lítur aftur á farna árið í venjarasessinum. Fyrsta uppgávan hjá Pæturi var UEFA Nations League kappingin, har mótstøðulondini vóru Slovakia, Moldova og Gibraltar.

– Hatta var eitt gott ár. Vit spældu fyrstu dystirnar longu í februar, og stúrdu tá fyri, um kropsligi formurin var nóg góður. Men tað var hann, og hóast vit taptu 3-0 í fyrsta dystinum, so vóru vit væl við og vit fingu so sigurin á Gibraltar nakrar dagar seinni.

– Tá vit so í apríl vinna á Moldova og Gibraltar á heimavølli, so var alt ljósareytt. Ein fantastisk vika, sum vit høvdu á Tórsvølli tá. Vit fingu tríggjar sigrar og ein javnleik, greiðir Pætur frá og staðfestir, at UEFA Nations League kappingin var ein staðfesting av góða arbeiðinum hjá kvinnulandsliðnum.

Hóast hann hevur sitið í stólinum í eitt ár, var tað ikki fyrr enn í november at hann kundi hugsavna seg fult og heilt um landsliðið, tí hann framvegis var knýttur at starvinum sum tekniskur stjóri. Men tá kvinnurnar nú fara undir HM undankappingina, er tað fyrstu ferð at Pætur „bara“ skal hugsavna seg um kvinnulandsliðið.

– Tað er nýtt hjá mær at vera venjari fulla tíð. Eg skal finna útav og læra meg at raðfesta tíðina og orkuna rætt. Vit hava eitt sterkt toymi kring landsliðið, og tað er ein styrki og ein fyrimunur, at bæði hjálparvenjarin, Jakoba Langgaard, og kropsligi venjarin, Eli Nolsøe Leifsson, eisini arbeiða fulla tíð í húsinum. Tey eru ikki fulla tíð um kvinnulandsliðið, men bara tað, at vit øll sita í sama rúmið dagliga, ger, at vit kennast væl og kunnu arbeiða tætt og væl saman.

Í hesari HM undankappingini eru bara trý lond í bólkinum, og tað ger, at kvinnurnar í ár bara spæla fýra undankappingardystir. Tó er eydnast at fáa avtalu í lag við kýpriotiska fótbóltssambandið, at Kýpros og Føroyar spæla venjingardyst mánadagin 2. mars. Og fimm dagar seinni, leygardagin 7. mars, verður hol sett á undankappingina. Fyrsti dystur verður á útivølli móti Grikkalandi, sum Føroyar eisini vóru í bólki saman við í seinastu EM undankapping,

– Vit kenna grikska liðið, og tá vit spældu móti teimum seinast, vóru tær betri, men vit vóru ikki langt frá teimum. Tær eru sterkar og eisini favorittar at koma víðari úr bólkinum. Georgia kenna vit ikki serliga væl. Tær vunnu móti Moldova, sum vit eisini hava vunnið á, so tær eru helst

> ***“Vit vilja vera við í kappingini um fremsta plássið í bólkinum”***

meira javnar við okkum, sigur Pætur Smith Clementsen, og leggur afturat, at føroyska liðið er væl fyrireikað til at spæla landsdyst tíðliga í mars.

– Aftur í ár liggja fyrstu dystirnir tíðliga á árinum, men vit hava havt venjingar í januar, sum riggaðu væl. Vit fara avstað í góðari tíð og fáa eisini ein góðan venjingardyst áðrenn og hava eisini nakrar dagar í Grikkalandi, har vit hava góða tíð at fyrireika okkum.

Pætur bæði vónar og trýr, at hendan undankappingin eisini fer at geva Føroyum nøkur stig. Men fyrst og fremst skulu avrikini vera góð, um úrslitini skulu koma.

– Vit vilja vera við í kappingini um fremsta plássið í bólkinum, og klára vit at halda Georgia aftanfyri okkum, so er bara eftir at elta Grikkaland. Tí verður eisini týdningarmikið, at vit avrika væl fyrsta dystin, sigur landsliðsvenjarin at enda.

# Go east! Eystur-evropa bíðar eftir søguligt landsliðsár



***Eftir søguliga gott ár hjá manslandsliðnum, sum rakk hæddunum við sigrinum á Kekkia, fyrireikar Eyðun Klakstein seg til nýggja UEFA Nations League-kapping. Aftur hesa ferð skulu fótbóltsmenninir royna at vinna í eysturevropa***

– Tað var ein venjari hjá mær, sum einaferð segði, at um fólk vænta nógv av tykkum, hava tit sum oftast sjálvir skyldina.

Venjarin Eyðun Klakstein er fullgreiður yvir, at tá hann og føroyska manslandsliðið av álvara fara undir nýtt landsliðsár, verður tað við øðrum fyritreytum enn fyri einum ári síðan. Ta ferðina var venjaraparið fesk og krøvini vóru – um ikki smá – so heldur ikki ovurstór. Soleiðis er ikki longur. Nú væntar føroyska fótbóltstjóðin aftur nógv av besta manslandsliðnum, og gamli ónevndi venjarin hjá Eyðuni Klakstein hevði rætt. Teir hava sjálvir skyldina.



Eyðun Klakstein

### ENDURREIST LANDSLIÐ SØGULIGA GOTT ÁR

Fyri góðum ári síðan fekk U21-venjaraparið Eyðun Klakstein og Atli Gregersen – millum fólk kendir sum Eyðun og Atli – fínasta starvið í føroyskum fótbólti. Í fyribils sessi høvdu hugsanarsami klaksvíkingurin og harðmælti gøtuskurin tryggjað Føroyum sigurin á útivølli ímóti Armenia á vetri í 2024, og nakrar mánaðir seinni fingu teir bjóðað tvey ára sáttmála. Teir tóku av, og síðan hava allir landsliðspilarnir peikað beint upp-eftir.

HM-undankappingin í 2025 gjørdist søguliga góð. Tað var sjón fyri søgn á stigatalvuni. Føroyar fingu 12 stig – tað er met – og fyri fyrstu ferð eydnaðist at hava pluss á samlaðu málkontuni. Á vøllinum var tað eisini eyðsæð. Uttan himpr varð spælt við fimm í verjuni, fýra á miðjuni og einum framherja. Verjuspæl, disiplin og góðir deyðbóltar vóru í miðdeplinum frá byrjan, og so líðandi mentist eitt kontraspæl, sum kundu hótta sjálvt tey stinnastu mótstøðuliðini. Alt hetta gekk upp í eina hægri eind í oktober.

Hanus Sørensen og Árni Frederiksberg skutu málini, tá Føroyar snøgt sagt smurdu Montenegro av á Tórsvølli, og bert dagar seinni eydnaðist at vinna á Kekkia, sum mangan hevur verið føroyingum beiskt mótstøðulið. Hanus Sørensen og Martin Agnarsson skutu málini í minniliga 2-1 sigrinum, ið fer í søgubøkurnar sum eitt hitt besta úrslitið hjá manslandsliðnum yvirhøvur.

– Dysturin ímóti Kekkia var ordiliga flottur. Eitt gott avrik frá okkum. Tá haldi eg, at vit onkursvegna rukku tað hægsta, sum vit hava rukkið, í hvussu er í tíðarskeiðnum hjá okkum. Vanliga hava føroyingar ikki havt ein livandi kjans ímóti Kekkia. Vit fingu eitt sindur fatur á teimum í útidystinum, sum teir kortini vunnu, og so at fara frá tí til at vinna á Tórsvølli. Tað var ein heilt serligur dagur og ein stór uppliving, sigur Eyðun Klakstein.

– Tað var eitt óvanligt ár, og tað sum so verður avbjóðingin hjá okkum nú er, hvat hendir frameftir. Var hatta tað stóra óvanliga árið hjá okkum, ella kunnu vit byggja meir upp á tað. Tað verður stóri spurningurin til 2026.

### GO EAST? EYSTUREVROPA BÍÐAR Í NATIONS LEAGUE

Eftir glæsiligu HM-undankappingina í fjør er UEFA Nations League á skránni í ár. Hóast fólk eru ymisk á máli um nýggjastu kappingina hjá UEFA, var sum vera man spenningur um lutakastið. Menn ynsktu sær San Marino, Ísland og kanska Bulgaria, sum er eitt av londunum, sum Føroyar framvegis ongantíð hava spælt ímóti, men í staðin komu Kasakstan, Slovakia og Moldova úr bollanum.



– Ítróttarliga eru møguleikar í lutakastinum. Tað vísir seg, at vit skulu spæla ímóti liðum eystanfyri, tá vit spæla landsdystir. Í ár verða bara lond úr gamla eysturblokkinum og upp aftur longur eysturi mótstøðulið. Men vit hava kjans ímóti hasum liðunum, heldur Eyðun Klakstein, sum kortini ikki fær latið verða við at ilskast inn á sjálva dystarskránna.

Tað er nevniliga so, at allir UEFA Nations League-dystirnir verða spældir í heyst. Fýra teir fyrstu verða spældir uppá smáar tvær vikur mánaðarskiftið September-oktober, og Føroyar spæla annanhvønn dyst heima og annanhvønn á útivølli. Hetta hevur nógva ferðing við sær, og tað er ikki frægasti háttur at fyrireika seg til landsdyst.

– Tað er heilt greitt, at hini londini í bólkinum – serliga Kasakstan og Slovakia – hava fyrimun av dystarskránni, soleiðis sum hon er løgd av UEFA. Men nú verður hon sum hon er. Vit fáa ikki broytt hana. Men sum eg plagi at siga, so eru oddsini ímóti okkum hvørja ferð vit spæla, og vit taka bara nógvu ferðingina við í rúgvuna, sum vit skulu 'vinna á', sigur Eyðun Klakstein.

Landsliðsvenjarin er ikki bangin fyri at seta landsliðnum høg mál, og tað ger hann aftur hesa ferð, hóast hann fegin vildi sloppi undan Slovakia, sum verður mett at vera sterkasta lið í deild C.

***“Vit skulu fara eftir so góðum úrslitið sum gjørligt, og fara eftir einum 2. plássi í minsta lagi”***

– Teir eru stórfavorittar í bólkinum, og so eru tað Kasakstan og Moldova. Vit skulu fara eftir so góðum úrslitið sum gjørligt, og fara eftir einum 2. plássi í minsta lagi. Tað skulu vit satsa upp á, og so skulu vit vita, um vit fáa gjørt okkurt við Slovakia. Skal tað eydnast at fáa góð úrslit, snýr tað seg fyrst og fremst um at gera tað á heimavølli, og so mugu vit stjala okkum úrslit í útidystunum, sum verða eitt sindur truplir, sigur Eyðun Klakstein.

Skorið inn á bein er ongin orsøk til, at 2025 skal gerast eitt serár hjá manslandsliðnum, heldur Eyðun Klakstein.

– Vit hava góðar møguleikar fyri at fáa góð úrslit aftur í 2026, men tað botnar sjálvandi í tí arbeiði, sum verður gjørt á vøllinum. Tað sum vit skulu gera í smáum løtum í dystum her og har. Tað er tað, sum alt snýr seg um, og tað fara vit eisini at hava í miðdeplinum.

Vónirnar eru góðar, krøvini eru høg, men tað hava teir sjálvir skyldina av.



Fróði Løkságarð

# Tá føroyskur fótbóltur fekk xG, og sofavenjarin gjørdist serfrøðingur

***Einferð var føroyskur fótbóltur einfaldur. Vit spældu á grúsi, og hevði tú ein bólt og nakrar eldsálir bar til at bjóða av. Var tú so heppin at tú eisini hevði ein góðan miðvallara við eymari lysku, og ein málsøknan áleypara, sum hevði etið ov nógvar frikadellur, so hevði tú eisini ein kjans***

Í dag tosa vit um heatmaps, gegenpress, xG og greinarar við teldu á síðulinjuni. Nú verður eingin dystur spældur uttan eina nágreiniliga dystarætlan. Borin fram í flottari power point framløgu, sum tað sama kundi verið gjørd hjá ráðgevarafyritøku í høvuðsstaðanum

Vit hava flutt okkum langt, sera langt. Tá vit fyrr tosaðu um ein arbeiðssaman bakk, so er hann í dag blivin til ein inverted full-back, sum í umstilling fer í half space, og skapar overload á weak side. Fyrr høvdu vit sagt, hann rennur nógv.

Vit hava eisini fingið sofavenjarar. Teir eru eftirhondini so nógvir at tað er ivasamt um teir allir høvdu rúmast í hondbóltshøllini við Tjarnir. Teir eru vápnaðir við kaffikrússi, LiveScore og so sjálvandi Facebook, har teir vinna dystir, serliga eftir at teir eru spældir.

"Hatta líkist ongum, vit kunnu ikki liggja so djúpt móti hasum liðnum. Vit skulu pressa hægri!" – tað sigur Álvur, sum ikki hevur spælt ein dyst síðani økiskappingina í piltadeildini. "Tað sæst langan veg at dómarin hevur fingð eitt krov frá KÍ", svarar Maria, sum fekk ein sting í knæðið í 1998, og gavst at spæla tá, og síðan hevur selt kaffi í hálvleikinum. Men sofavenjararnir hava altíð rætt. Helst eftir dyst.

Við nýggju tíðini komu eisini pengarnir og professionaliseringin. Fyrr fingu leikarar eina pylsu og eina sodavatn umborð á Smyrli á veg norður aftur av Tvøroyri, og vóru nøgdir. Teir spædu fyri felagið, fyri bygdina, fyri litirnar, og fyri pápan, sum stóð á síðulinjuni og geylaði, og sum oftast segði okkurt býtt.

Nú er fótbóltur eisini Excel, umboðsmenn, bonusskipanir og sign-on fees. Spælarar koma og fara úr øllum ættum. Teir enda í miðlunum, og eftir ein krákumánaða í Sundalagnum vita teir alt um felagið, og elska lokalu mentanina.

Føroyskir leikarar leita eisini út um landoddarnar. Teir eru heilt í tráð við galdandi fótbóltsmentanina blivnir ein søluvøru. Føroyskir leikarar spæla heilt úr Kasakstan til Italia, har Andrias Edmundsson nú roynir seg í fremstu røðini. Vit eru við og vit blíva betri.

Hóast broytingarnar, so er vakurleikin kortini enn til staðar. Ein glíðandi takling eitt mánakvøld í oysandi regni og vindi í Sarpugerði, ein dystarvinnandi bjarging í 92. minutti í Gundadali, og ikki minsti ungi lokali leikarin sum gloymur alt um xG, men bara smekkar kúluna í kassan.

Til alla lukku snýr fótbóltur seg framvegis um kenslur og at hava hjartað við. Tá kappingin um nakrar vikur byrjar aftur, so verða dátur greinaðar, vit fara at tosa um taktikk, og sofavenjarar fara at gera sínar lemjandi niðurstøður. Men vit fara eisini at hava gleðina, og so leingi onkur fer at skræða seg sundur á vøllinum fyri merkið á bringuni, so livur føroyskur fótbóltur. Við ella uttan xG.

**Gott kappingarár!**



# LANDSLIÐSSKRÁIN 2026

| DATO | LANDSLIÐ | KAPPING / DYSTUR |
|---|---|---|
| **29. januar** | U19 gentur | **FØROYAR** – Sámaland ( venjingardystur ) |
| **29. januar** | U19 dreingir | **FØROYAR** – Sámaland ( venjingardystur ) |
| **31. januar** | U19 gentur | **FØROYAR** – Sámaland ( venjingardystur ) |
| **26. feb. - 4. mars** | U17 dreingir ( 2010 ) | UEFA menningarkapping í Føroyum |
| **2. mars** | A kvinnur | Kýpros – **FØROYAR** ( venjingardystur ) |
| **3. - 8. mars** | U19 gentur | Baltic Cup |
| **7. mars** | A kvinnur | Grikkaland – **FØROYAR** ( HM 2027 ) |
| **9. - 18. mars** | U16 gentur | UEFA menningarkapping í Moldova |
| **12. - 18. mars** | U17 gentur | EM undankapping í Slovenia |
| **23. - 31. mars** | A menn | Venjingarlega |
| **25. - 31. mars** | U19 dreingir | EM undankapping í Niðurlondum |
| **25. - 31. mars** | U17 dreingir | EM undankapping í Onglandi |
| **27. mars** | U21 | Sveis – **FØROYAR** ( EM 2027 ) |
| **12. - 18. apríl** | U19 gentur | EM undankapping í Litava |
| **14. apríl** | A kvinnur | **FØROYAR** – Grikkaland ( HM 2027 ) |
| **18. apríl** | A kvinnur | **FØROYAR** – Georgia ( HM 2027 ) |
| **1. - 9. juni** | A menn | Venjingardystir |
| **5. juni** | A kvinnur | Georgia – **FØROYAR** ( HM 2027 ) |
| **28. juni - 6. juli** | U17 gentur | Baltic Cup í Lettlandi |
| **25. septembur** | U21 | Estland – Føroyar ( EM 2027 ) |
| **26. septembur** | A menn | **FØROYAR** – Kasakstan ( UNL 2026-2027 ) |
| **29. septembur** | A menn | Moldova – Føroyar ( UNL 2026-2027 ) |
| **30. septembur** | U21 | **FØROYAR** – Luksemborg |
| **2. oktobur** | A menn | **FØROYAR** – Slovakia ( UNL 2026-2027 ) |
| **6. oktobur** | A menn | Kasakstan – **FØROYAR** ( UNL 2026-2027 ) |
| **6. oktobur** | U21 | **FØROYAR** – Ísland ( EM 2027 ) |
| **27. - 31. oktobur** | U17 dreingir | EM undankapping í Kýpros |
| **13. novembur** | A menn | Slovakia – **FØROYAR** ( UNL 2026-2027 ) |
| **16. novembur** | A menn | **FØROYAR** – Moldova ( UNL 2026-2027 ) |

# Meistara Deildin



BYGMA BALSLEV | FØROYATELE | ATLANTIC AIRWAYS